# ENDURSKOÐAN AV SKIPANINI VIÐ ALMENNUM BYGGIVERKÆTLANUM

FØROYA LANDSSTÝRI
THE GOVERNMENT OF THE FAROE ISLANDS

# INNLEIÐSLA

Arbeiðsbólkurin hevur havt eina tilgongd, sum tekur støði í:

- Arbeiðssetningini frá landstýrinum
- Trimum yvirskipaðum uppskotum fyri almenna bygging
- Hoyringstilfari frá samanlagt 14 viðkomandi hoyringspørtum
- Greining og samanumtøka av samlaða tilfarinum

Evnið um almenna bygging er breitt og umboðar fleiri parametrar og dimesjónir. Tilgongdin hjá arbeiðsbólkinum tekur einans útgangsstøði í bygnaðarliga parametrinum í mun til eitt nú ábyrgdarbýti og organisatiónsbygnað. Úrslitið av arbeiðinum tekur tí støði í einum út av fleiri parametrum, sum skapa samlaða avgerðargrundarlagið fyri hvussu almennar byggiverkætlanir kunnu skipast framyvir. Aðrir parametrar eru eitt nú tað fíggjarliga og byggifakliga vitan.

Úrslitið er ein lýsing av sjónarmiðum og royndum hjá viðkomandi pørtum um bygnaðarliga partametrið við almennum byggiverkætlanum.

FØROYA LANDSSTÝRI
THE GOVERNMENT OF THE FAROE ISLANDS

# ARBEIÐSSETNINGUR

- Landsverk hevur síðani 1. januar 2001 havt ábyrgd, sum byggiharri, av allari almennara bygging og nýbygging
- Upprunaliga grundgevingin var, at tað fakliga og fíggjarliga var skynsamt at savna alla byggiumsiting á einum stað, heldur enn at hvørt stjórnarráð hevði egna byggiráðgeving
- Seinnu árini hevur kjak verið um leiklutin hjá Landsverki sum byggiharri við støði í stórum byggiverkætlanum, sum eitt nú Glasir og H-bygninginum
- Arbeiðsbólkur er settur at gera tilmæli* um, hvussu almennar byggiverkætlanir skulu skipast
- Arbeiðsbólkurin lýsir fyrimunir og vansar við trimum uppskotum til skipan av almennum byggiverkætlanum
- Útgangsstøðið er, at skipanin bygnaðarliga skal tryggja greiða leiðslu, ábyrgd og útinnan, tá ið almennar byggiverkætlanir verða framdar



**Arbeiðsbólkurin hevur tikið avgerð um gera eina lýsing, heldur enn at koma við einum tilmæli.*

# YVIRSKIPAÐ TILGONGD

1) Arbeiðsbólkurin eyðmerkir trý uppskot til skipan av almennum byggiverkætlanum

2) 14 viðkomandi hoyringspartar fáa høvi at taka lut í tilgongdini og greiða frá sínum sjónarmiðum skriliga og munnliga

3) Hoyringspartar fáa tilfar sendandi, freist at koma við hoyringssvari og innbjóðing til hoyringsfund.

4) Tilfarið frá arbeiðsbólkinum til hoyringspartar inniheldur:
   A. Fylgibræv, ið greiðir frá tilgongdini og tíðarfreistum hjá hoyringspørtum
   B. Upprit, ið greiðir frá grundarlagnum undir arbeiðinum og arbeiðstilgongdini
   C. Framløgu, ið eyðmerkir tríggjar møguleikar fyri almenna bygging

5) Arbeiðsbólkurin fær skrivlig hoyringssvar frá hoyringspøtum og skipar fyri munnligum hoyringsfundir við somu pørtum

6) Arbeiðsbólkurin greinar og viðgerð innkomna skrivliga og munnliga tilfarið

7) Tilfarið verður sett saman við støði í yvirskipaðum eygleiðum og royndum.

8) Úrslitið av arbeiðinum verður latið løgmanni til støðutakan

# HOYRINGSPARTAR

- Almanna- og mentamálaráðið
- Almannaverkið
- Arkitektafelagið
- Barna- og undirvísingarmálaráðið
- Bústaðir
- Gjaldstovan
- Heilsumálaráðið
- Landsverk
- Ráð
- Ráðgevarafelagið
- ES-tunlar
- Sjúkrahúsverk Føroya
- Undirvísingarstýrið
- Vinnuhúsið/Arbeidsgevarafelagið

FØROYA LANDSSTÝRI
THE GOVERNMENT OF THE FAROE ISLANDS

# TRÝ UPPSKOT TIL SKIPAN AV ALMENNUM BYGGIVERKÆTLANUM

Løgtingsgrannskoðararnir mæla til eitt greiðari ábyrgdarbýti, har tað landsstýrisfólkið, sum fær játtanina, stendur fyri byggingini og hevur fíggjarliga og fakliga ábyrgd, soleiðis sum lóg um ábyrgd landsstýrismanna ásetir um býtið á málsøkjum.

Tørvur á at fáa greiðar reglur um hvussu almennar byggiverkætlanir skulu stýrast, og eyðmerkja ábyrgd og leiklutir, tá ið almennar byggiverkætlanir verða framdar.

Arbeiðsbólkurini boð uppá trý ymisk uppskot, sum møta hesum tilmæli.

**Uppskot 1:** Verandi skipan - við dagføringum

**Uppskot 2:** Ábyrgdin aftur til einstøku ráðini

**Uppskot 3:** Eitt ráð, sum hevur alla ábyrgdina

FØROYA LANDSSTÝRI
THE GOVERNMENT OF THE FAROE ISLANDS

# UPPSKOT 1:
## VERANDI SKIPAN - VIÐ DAGFØRINGUM

**Fyrimunir**

- Miðsavnan av byggiharraráðgeving og harvið møguleiki at byggja upp eina tekniska umsiting við fakligum førleika á høgum stigi
- Verkætlanarstýring, ið kann taka sær av stórum byggiverkætlanum

**Vansar**

- Fíggjarliga ábyrgdin ikki nóg greið
- Leiðsla og ábyrgd í byggiverkætlanum ikki nóg greið
- Landsstýrisfólk hava trupult við at halda sínar eftirlitsskyldur



# UPPSKOT 2:
# ÁBYRGDIN AFTUR TIL RÁÐINI

## Fyrimunir

- Greiðari ábyrgdarbýti, har landsstýrisfólkið, id fær játtanina, stendur fyri byggingini og hevur fíggjarliga og fakliga ábyrgd
- Leiðsla og ábyrgd í byggiverkætlanum greið
- Landsstýrisfólk betri møguleikar at halda eftirlitsskyldur

## Vansar

- Einstøku ráðini skulu byggja upp serfrøði í mun til stýring av størri byggiverkætlanum og hvussu samstarv við uttanhýsis byggiharraráðgevara verður lagt til rættis
- Vitanarspjaðing




FØROYA LANDSSTÝRI
THE GOVERNMENT OF THE FAROE ISLANDS

# UPPSKOT 3:
# EITT RÁÐ, SUM HEVUR ALLA ÁBYRGDINA




### Fyrimunir

- Øll ábyrgd savnað í einum ráði, sum er sett saman av serfrøðingum og sterkari fakligari vitan
- Fíggjarliga ábyrgdin greið
- Leiklutir í verkætlanini greiðir
- Leiðsla og ábyrgd í byggiverkætlanum greið

### Vansar

- Frástøða millum eigara av bygningi og ábyrgdarhavara av byggingini

| Hoyringspartar | Møguleiki 1 | Møguleiki 2 | Møguleiki 3 |
| --- | --- | --- | --- |
| Almanna- og mentamálaráðið | ✓ | | |
| Almannaverkið | | ✓ | |
| Arkitektafelagið | ✓ | | |
| Barna- og undirvísingarmálaráðið | ✓ | | |
| Bústaðir | ✓ | | |
| Gjaldstovan | | ✓ | |
| Heilsumálaráðið | ✓ | | |
| Landsverk | ✓ | | |
| Ráð | | ✓ | |
| Ráðgevarafelagið | | ✓ | |
| Sandoyartunnilin/Suðuroyartunnilin | | ✓ | |
| Sjúkrahúsverk Føroya | | ✓ | |
| Undirvísingarstýrið | | | ✓ |
| Vinnuhúsið/Arbeidsgevarafelagið | ✓ | | |

| | |
|---|---|
| Almanna- og mentamálaráðið | Vit eiga at royna at bøta um tað, sum ikki riggar, heldur enn at velja ein heilt nýggjan hátt at skipa alment byggjarí. Fyrimunurin við hesum er, at vit hugsavna okkum um tað, sum riggar, og tað, sum riggar minni gott í verandi skipan. Soleiðis verður hetta stýrandi fyri tí, ið skal broytast. Í so máta haldi eg, at rættast er at royna leið 1. Tað er rætt at sentralisera serfrøðina, tí mann kann fáa meira fyri virðið, tá ið mann samlar vitanina. Hetta skapar heldur ikki fjarstøðu millum tann, sum byggir og tann, sum eigur bygningin. Umráðandi at kenna eigaraskap og brenna fyri tí.<br>Men tað er viðkomandi at hyggja at, hvat tað er fyri stovnar, vit tosa um. Tad kann vera ymiskt hvør skal standa fyri byggingum. Eitt nú kundi AV staðið fyri byggingum av sambýlum/smáprojektum og við direktari linju á AV á odda, soleiðis mann ikki skal fyrihalda seg til fleiri partar. So kunnu stór projektir, sum eitt nú Tjóleikhúsið, liggja hjá Landsverki. Hetta svarar til model 2, men við tillagingum organisatoriskt í modellinum. |
| Almannaverkið | Almannaverkið hevur eitt stórt system, men ikki nógv stór projektir. Heldur hava vit nógv smá projektir allatíðina. Vit, sum hava ábyrgd av einum projekti, verða í dag sett út á gongina og sleppa ikki at sita við borðendan. Vit uppliva ferð eftir ferð, at vit ongantíð fáa tað, sum vit hava ynskt. Tað eru vit, sum skulu brúka bygningin í síðsta enda og liva við úrslitinum. Vit vita, hvat riggar og hava serfrøðina av tørvinum, og hvat hann inniber. Tí burdu vit fingið ein leiklut, sum er nógv størri og við meira ávirkan í projektum. Landsverk/arkitektarnir hava ein nógv ov dominerandi leiklut ídag. Vit hava eina sterka meining um, at byggjaríir eiga at liggja tættari hjá okkum. Vit kunnu gott vera byggiharrar, og hava ábyrgdina í síðsta enda. Við møguleika 2 høvdu vit bygt upp eina eind innanhýsis við projektleiðslu og viðkomandi kompetensum. Vit eru als ikki bangin fyri uppgávuni. Sum nú er, byrja verkætlanir á berum hvørja ferð við nýggjum fólkum og nýggjum ráðgevum. Hetta viðførir, at tað er tungt og dýrt at koma í gongd. Man lærir ikki av royndum, og man tekur ikki vitan við í næstu verkætlan. Almannaverkið viðmælir, at um man velur aðra loysn, enn møguleika 2, so at loyva byggiverkætlanum innan almannaøkið at verða bygdar eftir møguleika 2. |
| Arkitektafelagið | Í høvuðsheitum meta vit, at LV, sum hann riggar ídag, hevur gjørt framstig. Eitt nú í mun til kompetensur og estimeringar av byggikostnaðum. Tad er altíð gott vid tillagingum, men vit meta ikki, at mann eigur at fara ov ratikalt til verka. Vit vildu gjørt tillagingar, sum gera, at bygningar koma meira í fokus, ímeðan restin (infrakervi/vegastrekki/kavarudding) kemur í eina aðru rekkju. Mann eigur at sundurskilja hesi høvuðsøkir. Keep it simple. Landsverk ger annað enn at hava byggjarí. Tí mugu vit sentralisera alt nógv meira og byggja LV upp, heldur enn at splitta tað upp. Í mun til modell 1, so halda vit, at mann skal hava eina deild fyri seg, sum hevur egna ábyrgd og serfrøði við egnum stjóra. Altíð skilagott at foreinkla skipanina ella loysnina. Mann manglar, at fáa streamlinað nøkur økir og deildir á LV. Høvuðsargumentið er, at mann eigur at hava ein sterkan stovn, sum virkar, sum mentanarberi. Og vit eiga at geva eindini rættar umstøður fyri at virka og vaksa. Tí handlar tað eisini um dialog millum partar. |
| Barna- og undirvísingarmálaráðið | Avgerðandi fyri økini, sum bygt verður fyri, er at tey verða tikin við. Tað inniber innlit, og at økini eru umboðað. Eru tad skúlar, so er tað skúlaverkið. Er tað sjúkrahús, so er tað sjúkrahúsverkið. Tað eru tey, sum hava tørvin. Tað er ikki skilagott at fara inn og gera nógv smá Landsverk. Men ein møguleiki er at seta ein byggikønan, sum umboðar ráðini í samskiftinum við Landsverk. Model 1 ella 3 er ein møguleiki, um atlit verða tikin til 3 høvuðsøkir: Politiska ábyrgdin má vera umboðað, byggifakliga vitan og at økini, sum eiga bygningarnar, verða tikin við. Tað vilja altíð vera avbjóðingar, men við model 3 fer ráðið, sum varðar av Landsverk, ikki at kenna somu ognarkenslu, sum ídag. Vit eiga ikki at dumpa Landsverk, men heldur seta inn at tryggja stovnin og serfrøðina. Tað hevði kanska verið frægari at spaltað LV upp í verkætlanarleiðslu og vegarbeiði. So verður fokusið rætt fakliga og hildið verður fast um systemvitanina. So hevði verkætlanarleiðsla verið ein eind fyri seg, býtt í eina størri eind og eina minni eind. Størra eindin kundi verið knýtt at model 2, og fungerað sum ráðgevar. So kundi minna eindin havt samskifti við privatar aktørar. |
| Bústaðir | Vit meta, at verandi skipan – við dagføringum - er besta loysnin. Orsøkin er einahelst, at Landsverk hevur (ella eigur at hava) neyðugar førleikar og royndir til at kunna fyriskipa og stýra teimum byggiverkætlanum, sum talan er um. Byggiharraráðgeving og verkætlanarstýring á einum høgum fakligum støði kann best fáast til vega við at miðsavna hetta virksemið í eina eind.<br>Í mun til vansar um fíggjarliga ábyrgd, leiðsla, ábyrgd og eftirlitsskyldur hjá landsstýrisfólki, meta vit, at tað er ein spurningur um at hava røttu mannagongdirnar og tey røttu fólkini á røttum stað. Tað, at fleiri stórar verkætlanir ikki hava gingið so væl sum ætlað, kann (umframt feilir og manglar hjá Landsverk, ráðgevum ella byggiharranum) í nøkrum førum skyldast, at verkætlanirnar verða undirbudgetteraðar. Hetta soleiðis, at kostnaðarmetingar, og harvið játtanir, eru ov lágar frá byrjan, og so vilja trupulleikarnir koma fram seinni. Ein onnur orsøk til, at verkætlanirnar ikki eydnast væl kann vera, at verkætlanirnar verða strektar yvir eitt ov langt tíðarskeið. Jú longri ein verkætlan er ígongd, jú størri er vandin fyri, at kostnaðarmetingarnar ikki halda. Helst í teimum førum, har broytingar í verkætlanini taka seg upp, meðan arbeitt verður. |
| Gjaldstovan | Vald og gjald má fylgjast at. Stovnar eiga sjálvir at standa fyri egnum, kompliseraðum bygningum, ímeðan LV eigur at standa fyri minni kompleksum verkætlanum (sum eitt nú skúlar og sambýlir). Sum eitt nú við H-bygninginum, so eigur LSH sjálvt at standa fyri hesar verkætlanin. Tað vil siga, at teir einføldu bygningarnir eiga at liggja hjá LV, og hitt eigur at liggja hjá einstøku ráðunum. Tí haldi eg, at loysnin er ein kombinatión millum loysn 1 og loysn 2. Eitt áhugavert ting er eisini, at mann ger eina felagsloysn fyri, at tað er ein, sum umsitur allar felagstænastur, sum kunnu bjóðast út til stovnar. Tad hevði kanska gjørt nakað við volumuna. LV eigur at bjóða nógv meira út, td. projektleiðslu, byggiskráir, eftirlit og byggileiðslu. Tað er týdningarmikið, at ein myndugleiki við LV kann tryggja: At vit fáa nokk fyri pengarnar, nøktandi tilgongdir, sáttmálaviðurskifti/løgfrøði, meting av verkætlanum, verkætlanarleiðslu og nøktandi góðsku. |
| Heilsumálaráðið | Møguleiki 1 er góður til minni verkætlanir, umbyggingar oa. Men tad gongur galið, tá ið tað kemur til stórar verktælanir sum t.d. H-bygningin. Grundin er serliga, at lurtað ikki verður nóg væl eftir teimum, sum kenna tørvin. Tá ið kompleksiteturin blívur ov nógvur, hoppar ketar ofta av. Og tað er altíð kompleks við t.d. sjúkrahúsbygging. Verandi skipanin riggar til smáar verkætlanir. Tí kundi mann hugt eftir einari loysn, sum liggur millum møguleika 1 og 2. Ein kombinatión. Vit hugsa ikki at avhøvda LV, tí LV hevur nógv góð ting eisini. Nógvar nýggjar mannagongdir hjá LV hava eyðnast ordiliga væl, og tad hevur havt betranir við sær. Tí kundi mann hildið fram vid teimum minni kompliseraðu verkætlanunum, ímeðan størri verkætlanir - sum td. Steno – kundu verið lagdar út til LSH at standa fyri. LSH hevur sterkar tekniskar eindir, sum kundi ligið sum paralell eind, ið tekur sær av byggiverkætlanum. LV roynir sítt besta, men teir hava ongan kjans, tí tey skulu lofta øllum. Í mun til fíggjarliga partin, so riggar hetta betri nú, enn tað hevur gjørt - men tað blívur altíð persónstengt. |

"Almannaverkið hevur eitt stórt system, men ikki nógv stór projektir. Heldur hava vit nógv smá projektir allatíðina. Vit uppliva ferð eftir ferð, at vit ongantíð fáa tað, sum vit hava ynskt. Tað eru vit, sum skulu brúka bygningin í sídsta enda og liva við úrslitinum. Vit vita hvat riggar og hava serfrøðina av tørvinum, og hvat hann inniber. Tí burdu vit fingið ein leiklut, sum er nógv størri og við meira ávirkan í projektum. Vit hava eina sterka meining um, at byggjaríir eiga at liggja tættari hjá okkum. Vit kunnu gott vera byggiharrar, og hava ábyrgdina í síðsta enda. Við eru ikki bangin fyri uppgávuna. Sum nú er byrja verkætlanir á berum hvørja ferð, nýggj fólk og nýggir ráðgevar. Hetta viðførir, at tað er tungt og dýrt at koma í gongd." - *Almannaverkið*

"Landsverk hevur gjørt framstig. Eitt nú í mun til kompetensur og estimeringar av byggikonstaðum. Tad er altíð gott vid tillagingum, men vit meta ikki, at mann eigur at fara ov ratikalt til verka. Men ein tillaging kundi verið, at bygningar koma meira í fokus, ímeðan restin (infrakervi/vegastrekki/kavarudding) kemur í eina aðru rekkju. Mann eigur at sundurskilja hesi høvuðsøkir. Keep it simple" - *Arkitektafelagið*

"Avgerdandi fyri økini, sum bygt verdur fyri, er at tey verða tikin við. Tad inniber innlit og at mann er umbodar. Eru tad skúlar, so er tad skúlaverkid. Er tad sjúkrhús, so er tad sjúkrahúsverkid. Tad eru tey, sum hava tørvin. Tað er ikki skilagott at fara inn og gera nógv smá Landsverk. Men ein møguleiki er at seta ein byggikønan, sum umboðar ráðini í samskiftinum við Landsverk" - *BUMR*

"Vit hugsa ikki at avhøvda Landsverk, tí stovnurin hevur nógv góð ting eisini. Nógvar nýggjar mannagongdir hava eyðnast ordiliga væl, og hava betranir við sær. Tí kundi mann hildið fram vid teimum minni kompliseraðu verkætlanunum, ímeðan størri verkætlanir - sum td. Steno – kundu verið lagdar út til LSH at standa fyri. LSH hevur sterkar tekniskar eindir, sum kundi ligið sum paralell eind, ið tekur sær av byggiverkætlanum. Landsverk roynir sítt besta, men teir hava ongan kjans, tí tey skulu lofta øllum. - *Heilsumálaráðið*

| | |
|---|---|
| Landsverk | Í fyrireikingini av øllum verkætlanum, sum eru settar í gongd aftaná 2020, er dentur lagdur á fyrireiking, leypandi váðametingar og neyva fíggjarstýring soleiðis, at Landsverk í dag støðugt hevur eina dagførda mynd av øllum teimum umleið 2,5 mia krónunum, sum eru settar í fleiri enn 70 ymiskar verkætlanir. Eitt fjølbroytt og fakliga sterkt umhvørvi er skipað á Verkætlanardeildini, sum umsitur allar verkætlanir á Landsverki. Starvsfólkini á deildini arbeiða eftir sama verkætlanarleisti, í somu skipanum og kunnu arbeiða uppá tvørs við ymsum verkætlanum og deildum. Úrslitið er, at einhvør verkætlan hevur atgongd til eitt munandi sterkari fakligt umhvørvi við verkfrøðingum, byggifrøðingum, løgfrøðingum, fyrisitingarfólki, arkitektum, búskaparfrøðingum og maskinmeistarum. Eitt fakligt umhvørvi, sum megnar at seta seg inn í kompleksar verkætlanir, síggja veikleikar og avbjóðingar og ikki minst hava eitt javnbjóðis samstarv við uttanhýsis ráðgeving. Vísandi til omanfyristandandi mælir Landsverk til at hildið verður fram við tí skipan vit kenna í dag. Hetta er bygnaðarliga sama skipan, sum í Noregi, har tey hava góðar royndir at minka um váðan í almennum byggiverkætlanum. Mælt verður til at Fíggjarmálaráðið, Fiskvinnu- og samferðslumálaráðið og Landsverk fara undir at gera ein leist til at fyrireika verkætlanir eftir, eins og gjørt er í okkara grannalondum. |
| RÁÐ | Út frá okkara royndum, er tað týdningarmikið at hava eina so einfalda byggiorganisatión sum gjørligt, har tað er møguligt at taka neyðugar avgerðir undir ábyrgd. Veikleikin við verandi skipan er, at ábyrgdarbýtið tykist ógreitt, eftirsum einstøku aðalráðini, (arbeiðsánararnir), sita við fíggjarligu ábyrgdini, meðan stýringin av verkætlanini (byggiharrin) liggur í einum stovni undir einum øðrum ráð. Tí verður frástøðan størri millum arbeiðsánara og projektið, og arbeiðsánarin hevur truplari við at fylgja við búskapinum í verkætlanini. Skipanin tykist fløkt og lítið smidlig, og hetta er helst ein vansi, tá viðurskifti í eini byggiverkætlan vanliga krevja rímiliga skjótar avgerðir. Møguleiki 2 hevur eitt greitt ábyrgdarbýti millum partarnar, og møguleikin fyri misskiljingum og feilum átti at verið minni. RÁÐ hevur góðar royndir við, at arbeiðsánarin og byggiharrin er tann sami, og er tað tann skipanin, sum er tann mest vanliga í teimum verkætlanum, sum RÁÐ hevur luttikið í. Hesin møguleiki gevur vanliga tann neyðuga fleksibilitetin, sum tørvur er á í byggimálum, tá tað eru fá løg og ómakaleysari at fáa avgerðir tiknar undir tí ábyrgd, sum partarnir hava fyri tíð, dygd, funktión og kostnaði. |
| Ráðgevarafelagið | Byggiharrarollan er ein rolla í sær sjálvum, og vit kunnu gott gera tað. Hetta er tann sterki innkeyparin, sum skal leggja væl frá landi frá byrjan. Syrgja fyri, at politikkarir leggja eitt risikotillæg. Byggirharrin skal klára at handfara hetta - uppeftir eisini. Um ein byggiharraráðgevi kemur inn, so skal hann hjálpa projektleiðaranum. Arkitektarnir koma inn og gera nakrar kravfestingar fyri byggjaríini. Byggiharraráðgevingin er tað, sum vit altíð hava havt og má ikki leggja eina frástøðu millum tey, sum hava skil uppá at projektera og byggja. Haldið organisatiónina niðri á einum minium og samlið kompetensurnar. Um mann desentraliserar og leggur tad út, so er vørurnar har, sum kunnu hjálpa til við eitt nú byggiharraráðgevararoyndum. Tað má bara ikki blíva eitt lag millum byggiharran og projektleiðsluna. |
| Sandoyar- og suðuroyartunnilin | Sum nógv av ráðunum, so eru vit ein eingangsbyggiharri. Til verkætlanir hava vit tikið fólk inn eftir tørvi, eisini hóast verkætlanirnar hava fevnt yvir nógv ár. Tað óhepnað við at býta sundur til ráð er, at serfrøðin lættari dettur burtur og at systemvitanin hvørvur. Vit hava í Føroyum nakrar fyritøkur, sum byggja og gera stórar verkætlanir, og tað er óheppið, at nakrar av hesum verða bundnar í almennar stovnar, heldur enn, at alt landið kann fáa gagn av tí. Ráðgevar, sum hava nógvar royndir, vita hvat skal til, tá ið stórar verkætlanir eru og kenna týdningin av at verja byggiharran.<br>Tað hevur sum heild verið ov stór útskifting á verkætlanunum, sum hava verið, og sum eru. Tað er kanska óheppið, at lønarlagið er so bundið innan tað almenna. Samanumtikið: Model 2 hevði riggað væl og spælir væl saman við mínum royndum. Tey, sum skulu brúka bygningin, mugu sleppa at vera tættari uppá soleiðis, at endaúrslitið hóskar til tey, sum skulu brúka bygningin. |
| Sjúkrahúsverk Føroya | Útfrá okkara royndum við verkætlanini um H-bygningin, og annars øðrum byggi- og viðlíkahaldsverkætlanum seinastu árini saman við Landsverk, meta vit, at møguleiki 2 sannlíkt er tann loysnin, sum vit á Landssjúkrahúsinum fara at mæla til. Um hugsað verður um sjúkrahúsbygging bæði nú og frameftir, so meta vit, at vitanin til tílíka bygging liggur best í HMR/Sjúkrahúsverkinum. Ein orsøk er manglandi kontinuitetur. Av teimum starvsfólkunum á Landsverk, sum vóru við at byrja H-bygningsverkætlanina, eru í dag eingin ella nærum eingin eftir á stovninum. Verkætlanin við H-bygninginum hevur borið kostnaðin av øllum hesum fólkunum undir byggitíðarskeiðinum. Vit meta, at við møguleika 2, so er møguligt at spara burtur hesi millumlið. Stovnar sum Landssjúkrahúsið umboða ein sera stóran part av øllum almennum bygningum hjá landinum, og harvið eisini núverandi og komandi verkætlanir. Vit meta ikki, at tað er ein vansi, at HMR/Sjúkrahúsverkið byggir eina 'verkætlanareind' upp við egnari serfrøði í mun til leiðslu av sjúkrahúsbyggjaríi. Vit høvdu lagt okkum eftir at skilja rakstur og verkætlanarleiðslu frá hvørjum øðrum soleiðis, at mann hevur eina serstaka eind. Vit hava grundarlag fyri hesum, tí tað eru allatíðina byggjarírir í gongd. Vit høvdu sjálvi staðið fyri byggiharraráðgevingini, men vit høvdu samstundis hugt eftir støddini og kompleksitetinum av verkætlanini. Um LSH skuldi staðið fyri eitt nú at byggja eina Steno-miðstøð, so høvdu vit bygt eina interna verkætlanarleiðslu upp og farið út í býin eftir at byggja stóru karmanar (betingd, soylur), og sjálvi tikið okkum av tí interna (tað funktionella, internir karmar, streym). Vit høvdu kunnað gjørt tað minst líka gott sjálvi, ella nógv betri. Hetta hevði havt við sær, at stovnurin hevði bygt upp kompetensur. Vit høvdu havt serfrøðina in-house við onkrum, sum kennir LSH. Vit duga vit væl at síggja, at møguleiki 1 kann geva góða meining fyri smærri stovnar, har ein 'verkætlanareind' ikki kann bera seg. |
| Undirvísingarstýrið | Vit hava onkuntíð tosað um, at stjóranarráð burdu havt onkran byggikønan, sum kann spæla við í samband vid byggiverkætlanir. Vit hava eina skipan, sum eg ikki føli meg tryggan við. Hon er blivin betri. Men fundirnir ganga ofta út uppá, at Landsverk skal sannføra okkum um, at alt gongur, sum tað skal. Men forholdið koyrir uppá, at manglandi álit er, hóast eftirlitið er gott. Tí hevði tað følst tryggari, um mann hevur eitt model 3, har alt er savnað á einum stað. So kundi mann bygt nakrar stápar upp, sum høvdu projektkompetensur og byggiráðgevarakompetensur. Tað tryggjar greitt ábyrgdarøki og álit. Men við verandi skipan, kundi riggað betur, um hildið verður fram við stýrisbólkum, har formaðurin hevur mandat/veto og rapporteraði rætt (greið fíggjarstýring). Sum nú er havi eg, sum nevndarformaður ikki atgongd til tey, sum skulu tryggja, at tingini koyra (Landsverk). |
| Vinnuhúsið/Arbeidsgevarafelagið | Verandi struktur virkar ikki nóg væl. Tað er ikki optimalt, at játtanin liggur eitt stað og byggingin er eitt annað stað. Tad eigur at vera ein sentral eind, tí tað er ein góð loysn og samlar tingini. Tað er í stóran mun ikki ein spurningur um organisatión einans, men hvat tú koyrir í hana. Skapar tú eina hepna organisatión, eru størri líkindi fyri, at tú fært samlað tey góðu fólkini og førleikar. Tað sentrala nýtist ikki at vera so stórt. Kjarnan eigur at bestanda av: verkætlanarleiðslu, fígging og kontraktum. Og so má mann byggja restina útfrá tí. Hetta sentrala er vigtigt fyri eigaraskapin. Hevur tú eina sentrala organisatión, so hevur tú betri umstøður fyri at byggja førleikar upp vid tíðini, sum kann tryggja almennu byggjaríini. Landið fer altíð at hava tørv á hesum grundførleikur, tí tey hava altíð byggjaríir. Landið skal hava eina sterka byggiharraráðgevaraorganisatión/innkeypara. Tað er tann rollan, sum LV hevur í dag – men hvat er LV ídag? Ein stórur, gráur massi, sum er ódefinerbarur. Ábyrgdin má kunna loysast politiskt. Skulu vit byggja sjúkrahús, so skulu pengarnir liggja har, sum sjúkrahúsið skal byggjast. Pengar og ynskir mugu fylgjast at. Tað er umráðandi at hava tað so einkult sum til ber, við so fáum fólkum sum tilber. |

“Í fyrireikingin av øllum verkætlanum síðani 2020 hava vit nú eitt fakligt umhvørvi, sum megnar at seta seg inn í kompleksar verkætlanir, síggja veikleikar og avbjóðingar og ikki minst hava eitt javnbjóðis samstarv við uttanhýsis ráðgeving. Landsverk mælir til, at hildið verður fram við tí skipan, vit kenna í dag. Hetta er bygnaðarliga sama skipan, sum í Noregi, har tey hava góðar royndir at minka um váðan í almennum byggiverkætlanum. Mælt verður til at Fíggjarmálaráðið, Fiskvinnu- og samferðslumálaráðið og Landsverk fara undir at gera ein leist til at fyrireika verkætlanir eftir, eins og gjørt er í okkara grannalondum. - Landsverk

“Út frá okkara royndum, er tað týdningarmikið at hava eina so einfalda byggiorganisatión sum gjørligt, har tað er møguligt at taka neyðugar avgerðir undir ábyrgd. Veikleikin við verandi skipan er, at ábyrgdarbýtið tykist ógreitt, eftirsum einstøku aðalráðini (arbeiðsánararnir) sita við fíggjarligu ábyrgdini, meðan stýringin av verkætlanini (byggiharrin) liggur í einum stovni undir einum øðrum ráð. Tí verður frástøðan størri millum arbeiðsánara og prosjektið, og arbeiðsánarin hevur truplari við at fylgja við búskapinum í verkætlanini … Vit hava góðar royndir við, at arbeiðsánarin og byggiharrin er tann sami” - *RÁÐ*

“Byggiharrarollan er ein rolla í sær sjálvum, og vit kunnu gott gera tad. Hetta er tann sterki innkeyparin, sum skal leggja væl frá landi frá byrjan. Syrgja fyri, at politikkarir leggja eitt risikotillæg. Byggirharrin skal klára at håndtera hetta - uppeftir eisini” - *Ráðgevarafelagið*

“Vit meta ikki, at tað er ein vansi, at HMR/Sjúkrahúsverkið byggir eina ’verkætlanareind’ upp við egnari serfrøði í mun til leiðslu av sjúkrahúsbyggjaríi. Vit høvdu lagt okkum eftir at skilja rakstur og verkætlanarleiðslu frá hvørjum øðrum soleiðis, at mann hevur eina serstaka eind. Vit hava grundarlag fyri hesum, tí tad eru allatíðina byggjarírir í gongd. Vit høvdu sjálvi staðið fyri byggiharraráðgevingini, men vit høvdu samstundis hugt eftir støddini og kompleksitetinum av verkætlanini” - *Sjúkrahúsverkið*

“Tað er í stóran mun ikki ein spurningur um organisation einans, men hvat tú koyrir í hana. Skapar tú eina hepna organisatión, eru størri líkindi fyri, at tú fært samlað tey góðu fólkini og førleikar. Tað sentrala nýtist ikki at vera so stór. Kjarnan eigur at bestanda av: verkætlanarleidslu, fígging og kontraktum. Og so má mann byggja restina útfrá tí. Hetta sentrala er vigtigt fyri eigaraskapin. Hevur tú eina sentrala organisatión, so hevur tú betri umstøður fyri at byggja førleikar upp vid tíðini, sum kann tryggja almennu byggjaríini. Landið fer altíð at hava tørv á hesum grundførleikur, tí tey hava altíð byggjaríir” - *Arbeiðsgevrafelagið*

# SMÁBROT UM TAÐ BYGNAÐARLIGA

Verandi skipanin riggar til smáar verkætlanir. Tí kundi mann hugt eftir einari loysn, sum liggur millum møguleika 1 og 2. Nógvar nýggjar mannagongdir hjá LV hava eyðnast ordiliga væl.Tí kundi mann hildið fram vid minni verkætlanunum við LV, ímeðan størri verkætlanir kundu verið lagdar út til eitt nú LSH at standa fyri.
*Heilsumálaráðið*

Tað, at fleiri stórar verkætlanir ikki hava gingið so væl sum ætlað, kann (umframt feilir og manglar hjá Landsverk, ráðgevum ella byggiharranum) í nøkrum førum skyldast, at verkætlanirnar verða undirbudgetteraðar. Hetta soleiðis, at kostnaðarmetingar og harvið játtanir eru ov lágar frá byrjan, og so vilja trupulleikarnir koma fram seinni.
*Bústaðir*

Tað er í stóran mun ikki ein spurningur um organisation einans, men hvat tú koyrir í hana. Skapar tú eina hepna organisatión, eru størri líkindi fyri, at tú først samlað tey góðu fólkini og førleikar.
*Vinnuhúsið/Arbeidsgevarafelagið*

Tað sentrala nýtist ikki at vera so stór. Kjarnan eigur at bestanda av: verkætlanarleidslu, fígging og kontraktum. Og so má mann byggja restina útfrá tí. Hetta sentrala er vigtigt fyri eigaraskapin. Hevur tú eina sentrala organisatión, so hevur tú betri umstøður fyri at byggja førleikar upp vid tíðini, sum kann tryggja almennu byggjaríini. Landið fer altíð at hava tørv á hesum grundførleikur, tí tey hava altíð byggjaríír.
*Vinnuhúsið/Arbeidsgevarafelagið*

Pengar og ynskir mugu fylgjast at. Tad er vigtigt at hava tað so einkult sum til ber, við so fáum fólkum sum tilber.
*Gjaldstovan*

Stjóranarráð burdu havt onkran byggikønan, sum kann spæla við í samband vid byggiverkætlanir.
*Undirvísingarstýrið*

Veikleikin við verandi skipan er, at ábyrgdarbýtið tykist ógreitt, eftirsum einstøku aðalráðini sita við fíggjarligu ábyrgdini, meðan stýringin av verkætlanini (byggiharrin) liggur í einum stovni undir einum øðrum ráð.
*RÁÐ*

Bygnaðurin eigur at verða so einfaldur sum gjørligt, soleiðis at tað ongantíð eru ivamál um, hvør hevur ábyrgdina.
*Gjaldstovan*

Vit eiga ikki at dumpa Landsverk.Tað hevði kanska verið frægari at spaltað LV upp í verkætlanarleiðslu og vegarbeiði. So verður fokusið rætt fakliga og hildið verður fast um systemvitanina. So hevði verkætlanarleiðsla verið ein eind fyri seg, býtt í eina størri eind og eina minni eind
*BUMR*

Verður øll umsiting koyrd út til ráðini, so mugu allar kjarnukompetensur byggjast upp, og vit fáa nógv smá Landsverk. Tá verður eingin vitan varðveitt í landinum.
*BUMR*

Tað má ikki vera ov stór fjarstøða millum tann, sum byggir og tann, sum eigur bygningin.
*RÁÐ*

vit vita ov lítið um føroyska bygging. Tí mugu vit sentralisera alt nógv meira og byggja upp, heldur enn at splitta nakað upp.
*Arkitektafelagið*

Mælt verður til at Fíggjarmálaráðið, Fiskvinnu- og samferðslumálaráðið og Landsverk fara undir at gera ein leist til at fyrireika verkætlanir eftir, eins og gjørt er í okkara grannalondum.
*Landsverk*

Avgerðandi fyri økini, sum bygt verður fyri, er at tey verða tikin við í tilgongdina í mun til innlit og umboðan. Hetta fyri at fáa rættast endaúrslit. Tað óhepnað við at býta sundur til ráð er, at serfrøðin lættari dettur burtur og at systemvitanin hvørvur.
*ES-tunlar*

Møguleiki 1 kann geva góða meining fyri smærri stovnar, har ein 'verkætlanareind' ikki kann bera seg.
*Sjúkrahúsverkið*

Við ráðgeving er skilagott at sentralisera serfrøðina. Soleiðis at tey serkønu kunnu fortelja okkum generalistum, hvat er best.
*AMMR*

Landið skal hava eina sterka byggiharraráðgevaraorganisatión/innkeypara.
*Ráðgevarafelagið*

Ein eind: Ein byggiharri, ein rádgevi og ein, sum byggir.
*Ráðgevarafelagið*

Keep it simple.
*Arkitektafelagið*

# EIN SAMLAÐ MYND VIÐ AVGERÐANDI PARAMETRUM

Við støði í hoyringstilfarinum frá øllum 14 hoyringspørtum eru ávís evni, ið ganga aftur í mun til skipan av almennum byggiverkætlanum. Tilfarið fevnir breitt, og tilfarið kann yvirskipað býtast í fýra høvuðsevnir:

- Evni 1: Tað bygnaðarliga
- Evni 2: Byggifaklig vitan
- Evni 3: Tað persónsbundnað
- Evni 4: Hugleiðingar um Landsverk

Øll fýra evnini ganga aftur hjá ymisku hoyringspørtunum, og eiga at verða tikin við í einum samlaðum avgerðargrundarlagið fyri endurskoðanina av almennum byggiverkætlanum.

FØROYA LANDSSTÝRI
THE GOVERNMENT OF THE FAROE ISLANDS

# VIÐMÆLI TIL KOMANDI FET Í TILGONGDINI

## Verandi skipan




## Tilgongd víðari

Næstu fet í tilgongdini eiga at nærlýsa aðrar avgerðandi parametrar, sum spæla inn í mun til at tryggja eitt støðugfast avgerðargrundarlag fyri møguligari umskipan. Parametrini eru eitt nú tað byggifakliga, tað persónsbundna og verandi royndir við og hugleiðingar um Landsverk.

## Nýggj/dagførd skipan

?

FØROYA LANDSSTÝRI
THE GOVERNMENT OF THE FAROE ISLANDS

# SAMANUMTØKA

- **Niðurstøða um møguleika 3** er, at undirtøka sum heild ikki er fyri hesum møguleika.

- **Niðurstøður um møguleika 1 og er 2** eru ikki eintýddar millum hoyringspartar. Møguleikarnir eru:
    - Møguleiki 1: Verðandi skipan við tillagingum
    - Møguleiki 2: Ein desentraliserað skipan

- **Niðurstøða um bygnaðarliga partin** er, at talan yvirskipað er um eitt út av fleiri høvuðsparametrum. Nakrir parametrar ganga aftur hjá ymisku hoyringspørtunum, og eiga at verða tikin við í einum samlaðum avgerðargrundarlagið fyri endurskoðanina av almennum byggiverkætlanum. Viðkomandi parametrar eru:
    - Tað bygnaðarliga
    - Byggifaklig vitan
    - Tað persónsbundnað
    - Hugleiðingar um Landsverk í verðandi skipan

**Almanna- og mentamálaráðið**

Takk fyri møguleikan at ummæla uppritið.

Um eg skuldi lagt nakað afturat motivatiónina fyri arbeiðinum - sum ivaleyst av røttum leggur stóran dent á evnir sum ógreitt ábyrgdarbýti og vantandi fíggjarstýring – so skuldi tað verið, at samskiftið millum partarnar í byggiverkætlanum (í hvussu so er á almannaøkinum) til tíðir kundi verið betri, og at størri dentur kundi verið lagdur á fyrireikingina av verkætlanum. So samskifti og fyrireiking eru sjálvstøðug evni at viðgera, tá byggiverkætlanir hjá landinum skulu eftirmetast.

Viðvíkjandi teimum trimum leiðunum, sum verða stungnar út í kortið, so haldi eg yvirhøvur, at man skal royna at bøta um tað, sum ikki riggar, heldur enn at velja eina heilt nýggjan máta at skipa alment byggjarí uppá. Fyrimunurin við hesum er, at vit hugsavna okkum um tað, sum riggar og tað sum riggar minni gott í verandi skipan, so tað verður stýrandi fyri hvat, ið skal broytast. Í so máta haldi eg, at rættast er at royna leið 1.

Tá tað er sagt, so eiga vit eisini at hugsa um:

1) at tað er sera stórur munur á støddini á okkara stovnum, og við hesum eisini á evnini hjá stovnunum at átaka sær byggileiðsluna,

2) at tað er sera stórur munur á kompleksitetinum á almennum byggjaríi og

3) at tað yvirhøvur er ein fyrimunur at hava eitt greitt ábyrdarbýti øllum lívsins viðurskiftum.

Almannaøkið er í roynd og veru skipað í 1 stovni nevniliga Almannaverkið (AV) við sínum áleið 1.200 starvsfólkum og 17.000 viðskiftafólkum, sum í sínum virki hevur brúk fyri ikki so fáum vardum bústøðum at húsa fólki við víðfevndum kropsligum og sálarligum breki. Eg meini at tað eru eini 75 ymisk matrikkul um alt landið, har AV veitir sínar tænastur.

Samanrenningin av

1) at vera tann størsti stovnurin í landinum, og sostatt kunna átaka sær stórar og kompleksar uppgávur,

2) at hava drúgvar royndir við at reka stovnar og sambýli, sum byggitekniskt og í funktionaliteti ikki víkja so nógv frá hvørjum øðrum, og har kostnaðurin fyri hvørt byggjaríið er lítil samanborið við tær størstu almennu byggiverkætlanirnar, og

3) at tað er ein fyrimunur um ábyrgdin av byggiverkætlanum er savnað á einum og sama málsræði,

ger at eg mæli tykkum til at umhugsa møguleikan fyri einum varianti av leið 2, har tað út frá eini ítøkiligari meting av omanfyrinevndu fortreytum verður loyvt landsstýrisfólki at skipa byggjarí sjálvt.

Vinaliga

Eyðun Mohr Hansen, Aðalstjóri

Almanna- og mentamálaráðið

**Hoyringsskriv: Almannaverkið**

Í samband við niðanfyri nevndu hoyring, hevur Almannaverkið hesar viðmerkingar til, hvussu vit síggja, at bygging av m.ø. sambýlum til Almnannaverkið kann skipast.

Seinastu árini hevur landið bygd fleiri nýggjar stovnar til ymiskar trivnaðartænastur hjá Almannaverkinum. Hetta eru í flestu førum nýggj sambýli til ymiskar málbólkar sum Almannaverkið varðar av. Millum hesar málbólkar eru sálarsjúk, menningartarn, likamligt brek og autismu. Felags fyri hesi byggjarí er, at talan er um nýggjar stovnar til millum 12 og 24 búfólk, og í nøkrum av førunum er talan um kombinerað sambýli við búplássum, umlættingarplássum og virknistilboðum, og at hesi stovnar eru bygdir eftir tørvinum hjá teimum ymisku málbólkunum.

Hóast talan er um er serbyggjarí, so er talan hóast alt ikki um kompleks byggjarí, men heldur um stovnspláss sum hava til endamálm, at skapa eitt heim til búfólkini, samstundis sum sambýlið stuðlar undir tí námsfrøðiliga og heilsurøktar tilboði sum Almannaverkið veitir borgarunum.

Nógv av serkunnleikanum sum er á námsfrøðiliga og heilsufakliga økinum í Føroyum er savnað á Almannaverkinum, samstundis sum serkunnleikin innan hjálpartól og endurvenjing eisini er partur av teimum tilboðum sum Almannaverkið veitir.

Hóast fleiri byggiverkætlanir seinastu árini, av sambýlum sum eru bygd til Almannaverkið, eru væleydnaðar, hvat tíðarætlan og byggikostnaður viðvíkur, so vísa royndirnar hjá Almannaverkinum, at ov stór fjarstøða er millum endabrúkaran (borgnarnar) og starvsfólkini sum skulu veita námsfrøðilig og heilsurøktar tilboðið, og byggiharran, í hesum førinum Landsverk.

Hendan fjarstøða hevur víst okkum, at óhepnar loysnir ofta verða valdar – loysnir sum hava óhepnar avleiðingar og sum ofta mugu broytast eftirfylgjandi, til stóran eyka kostnað – ella enn verri, at Almannaverkið má góðtaka eina vánaliga loysn, tí kostnaðurin at gera um er ov stórur. Ein loysn kundi verið, at knýtt Almannaverkið tættari byggingini og gav Almannaverkinum størri heimildir og størri ábyrgd. Vit meta ikki, at loysnin er, at enn fleiri partar skulu knýtast at byggiætlanunum, heldur skulu færri partar varða av byggiverkætlanunum.

Almannaverkið metir at verandi loysn hevur eina aðra avbjóðing. Seinastu árini hava vit bygt 3 sambýlir innan stutta tíð, og allar hesar verkætlanir eru eyðmerktar av at man byrjar á berum hvørja ferð, nýggj fólk og nýggir ráðgevar. Hetta viðførir at tað er tungt og dýrt at koma í gongd. Man lærir ikki av royndum, og man tekur ikki vitan við í næstu verkætlan.

Landsstýrið hevur ætlanir um at byggja fleiri nýggjar stovnar komandi tíðina, og tí metir Almannaverkið, at hetta talan fyri, at Almannaverkið, saman við avvarðandi aðalráðið sjálvt skal hava ein størri leiklut í byggingini av nýggjum stovnum til Almannaverkið, tá vit harvið kunnu tryggja, at fjarstøðan millum brúkarnar av stovstilboðnum og byggiharran gerst so lítil sum gjørligt.

Almannaverkið metir, at tá ið vit skulu byggja so nógvar stovnar, so kann tað við fyrimuni gerast við at ein fastan verkætlanarbólk sum tekur sær av hesum arbeiðið, og tryggjar at bygt verður skjótari, betri og bíligari, enn um vit byrja frá nýggjum hvørja ferð. Hugsandi vildi Almannaverkið fingið hjálp uttanhýsis til tær førleikar, Almannaverkið manglar.

Av teimum trimum uppskotum sum eru lagt upp til í uppritinum, so metir Almannaverkið, at møguleiki 2, har ábyrgdin aftur verður løgd til einstøku stjórnarráðini, hevur størst møguleika eydnast í samband við bygging av sambýlum o.ø. til Almannaverkið. Í øðrum lagi vil Almannaverkið viðmæla, at um man velur aðra loysn, enn møguleika 2, so at loyva byggiverkætlanum innan almannaøki, at verða bygdar eftir møguleika 2.

Vinaliga


**Høgni Olsen**

Fíggjarstjóri

Fyrisitingin

Beinl. tel. 347050

**ARKITEKTAFELAG FØROYA**
Postsmoga 1293 • FO-110 Tórshavn • ark@ark.fo• www.ark.fo•Tlf +298 214343

Løgmansskrivstovan
Att. Rakul Svabo Róadóttir
Tinganes
rsr@tinganes.fo

Tórshavn 8. september 2023

---

## Viðv.: Hoyring í sambandi við almennar byggiverkætlanir

Arkitektafelag Føroya hevur fingið tilsendandi hoyringstilfar um arbeiði, sum nú verður gjørt í sambandi við almennar byggiverkætlanir.

Nevndin í Arkitektafelagnum hevur viðgjørt tilsenda tilfarið í sambandi við hoyringina.

Nevndin kundi hugsa sær longri tíð at viðgjørt tilfarið, tí spurningarnir tað kemur inn á eru sera umfandi og týdningarmiklir. Og eisini tí at í hoyringstilfarinum verður víst verður ymiskt annað tilfar, sum er sera umfatandi.

Nevndin hevur tó avgjørt at svara nú, men vónar at høvi verður til at nágreina ymiskt í víðari tilgongdini.

## Royndir við verandi skipan

Arkitektafelagið tekur sær nú serliga av yvirskipaðum viðurskiftum innan fakøkið, meðan teknistovurnar nú í høvuðsheitum røkja síni áhugamál umvegis Ráðgevarafelagið og Vinnuhúsið.

Vit meta, at tað arbeiði, sum er framt innan Landsverk í sambandi við arkitekturpolitikk, er væl úr hondum greitt.

Ein týdningarmikil partur av menningini av arkitekturinum eru arkitektakappingar, og eisini her hevur Landsverk sýnt ábyrgd.

Landsverk hevur gjørt eitt stórt arbeiði við at vera við til at menna fortreytirnar fyri bygging í Føroyum, eitt nú við Bygningskunngerðini. Tó metir felagið, at meira átti at verið gjørt burturúr at kanna veruliga umstøðurnar og fortretirnar fyri bygging í Føroyum og at tillagað Bygningskunngerðina eftir hesum.

Tað er tó ein trupulleiki, at ov fáir arkitektar eru á Landsverk, og at ongin arkitektur situr í avgerandi størvum. Hetta hevur við sær, at avgerðir ikki hava neyðuga arkitektafakligu bakgrundina.

Eisini metir felagið, at viðhvørt verður ov litil orka brúkt uppá tað arkitektoniska og kvalitetin í umhvørvinum.

Felagið metir, at meira átti verið gjørt burturúr yvirskipaða planlegging.

## Yvirskipaðar viðmerkingar

Nógv verður gjørt burturúr H-bygninginum á Landssjúkarahúsinum. Og orsøk er væl til tess. Um H-bygningurin hinvegin er orsøkin til endurskoðanini av almennari bygging, so er tað kanska ikki heilt rættvíst, tí eisini uttanlanda hava stórar byggingar og serliga sjúkrahúsbyggingar havt trupulleikar.

Í tilfarinum sum verður víst til í hoyringsuppritinum, eru tó eisini frágreiðingar um trupulleikar við aðrar byggingar, men sýnist tó eisini sum, at man hevur lært av hesum og longu í stóran mun hevur framt neyðug tiltøk.

Ein betri málsetingur kundi verið at lagt dentin á, hvussu man kann fremja áhaldandi menningar innan byggiøkið, hetta innan øll lið.

Ein trupulleiki í hesum sambandi er, at Landsverk eisini hevur aðrar uppgávur enn bygging, og at byggiharrafunktiónin í sambandi við almenna bygging ikki er nóg týðulig í bygnaðinum á Landsverk. Her var fyrra skipanin við einum landsarkitekti undir Løgmansskrivuna týðuligari.

Her eigur ein álvarsliga at umhugsa at býta arbeiðið á Landsverk í tvey høvuðsøki: Eitt sum hevur miðvíst fokus uppá at vera byggiharri í sambandi við viðlíkahald, bygging og rakstur av bygningum. Og eitt annað sum tekur sær av vegir, infrakervi, aldumátingar v.m..

Ein partur sum kann fløkja, er hátturin ymsu heitini vera nýtt uppá, eitt nú byggiharri og arbeiðsánari, men skjølini, sum vera víst til, greiða frá, hvussu hetta er komið í lag og við hvørjum endamáli. Ein hátt lættari at skilja kundi tó verið, at gjørt greitt, at tað er landið, sum er byggiharri, men at henda byggiharrafunktiónin er løgd til Landsverk.

Stjórnarráðini kundu eisini verið styrkt við at førleikamenna tey fólk, sum samskifta við Landsverk, soleiðis at hetta samskifti í sambandi við bygging og viðlíkahald er grundað á innlit og kunnleika hjá ánara.

## Viðvíkjandi møguleika 1: Verandi skipan – við dagføringum

Tað eru nógvir fyrimunir við verandi skipan við Landsverki. Tá byggiharrafunktiónin er savnaður á einum staði, vilja eksternir ráðgevar og arbeiðstakarar vera tryggir við altíð verða viðgjørdir á sama hátt, og at forvæntningar og framferðir eru eins. Ein skal heldur ikki undirmeta týdningin av, at partarnir samstarva yvir fleiri verkætlanir. Og samstundis kann Landsverka taka samanum royndirnar frá ymsum byggingum og menna.

Tó er tørvur á broytingar innan Landsverk.

Fyrst og fremst eigur arbeiðið á Landsverk at býtast í tvey høvuðsøki: Eitt við einum landsarkitekti og eitt við einum landsverkfrøðingi. Umráðandi er, at báðir hava javnbjóðis myndugleika/ræðisrætt á hvør sínum ábyrgdarøki.

Landsarkitekturin við byggiharraábyrgd fyri bygging og viðlíkahald av bygningum. Landsrkitekturin eigur at manna upp við arkitektum, sum hava førleika innan plalegging, landslag og bygningar.

Landsverkfrøðingurin við byggiharraábyrgd av infrakervi: vegir, havnir, tunnlar, tylupallar og mátingum av ymsum slag.

Harafturat skal Landsverk hava eina felags plandeild, har landsarkitektur og landsverkfrøðingur samskipa síni fakøki og standa á odda fyri framtíðar planlegging.

Møguleiki 1 kundi verið viðkaður við tankanum í møguleika 2 um at styrkja ábyrgdina hjá stjórnarráðnum. Men hetta eigur at gerast við at førleikamenna stjórnarráðini heldur enn, at tey sjálvi skulu átaka sær byggiharrafuntiónir, sum eru betri røkt í eini felags stovni.

Møguleiki 1 kundi eisini verið víðkaður við tankanum í møguleika 3 um eitt møguligt Bygningsstýrilsi, men sum vit viðmerkja til henda møguleika, so verður menniskjaliga tilfeingið helst betri gangnýtt við, at uppgávurnar hjá einum tílíkum verður býtt millum stjórnarráð og Landsverk.

Ein vansi í møguleika 1 er kanska heitið á tí stjórnarráði, sum varðar av Landsverk. Serliga tá tvey vítt ymisk stjórnarráð vera løgd saman í eitt ráð. Um til ber heldur enn samanlegging at lata ein ráðharra hava tvey stjórnarráð undir sær so kundi stjórnarráðið kanska fingið eitt betri lýsandi heiti. Tá kundi ein eisini nærkast tann møguleikan, sum er lýstur í møguleika 3 uttan beinleiðis at seta eitt nýtt stjórnarráð á stovn.

## Viðvíkjandi møguleika 2: Ábyrgdin aftur til einstøku stjórnarráðini

Ein kann ivast í, hvørt orðingin „aftur“ er heilt lýsandi, tí hetta hevur ikki verið konsekvent og er í øllum førum frá einari aðrari tíð, har einklari krøv vóru til bygningar, og man kann ivast stórliga í, hvørt øll aðalráð eru veruliga før fyri at lyfta eina tílíka uppgávu uttan munandi uppbyggingar av økinum innanhýsis.

Ein vansi við hesum kann vera, at hvørt stjórnarráð, hóast ein felags leistur er at ganga eftir, í praksis vil fremja útbjóðingar á ikki heilt sama hátt. Hetta kann vera ørkymlandi fyri tær ráðgevarafyritøkur, sum átaka sær arbeiði, um nú hetta ávísa stjórnarráðið skilir og umsitir á sama hátt sum eitt annað stjórnarráð. Heldur er týdningarmikið at menna byggivinnuna undir einum. Her er ein loysn við einum stovni sum umsitir at fyritrekkja. Eisini vilja royndir frá einari verkætlan lættari kunna koma øðrum verkætlanum til góðar.

## Viðvíkjandi møguleika 3: Eitt stjórnarráð, sum hevur alla ábyrgdina

Høvuðsvansin við hesum møguleika er, at tað ikki loysir trupulleikan við, hvørt tað stjórnarráð, sum stendur sum ánari av byggingi, kann røkta sína ábyrgd, heldur tvørtur ímóti.

Ein kann eisini hugsa, hvørt hetta er tíðin at skapa eitt nýtt ráð. Heldur kundi ein hugsa sær at orkan varð nýtt til at styrka verandi stjórnarráð, sum varðar av Landsverki umframt at styrkja verandi Landsverk.

Eitt sum uppskotið leggur upp til er kanska, at tað longu tá ein bygging verður framd, eisini verður sett av til viðlíkahald (árliga), umvælingar (við nøkrum ára millumbili) og høvuðsumvælingar og dagføringar við nøkrum 10 ára millumbilum. Hetta er vanligur leistur. Møguliga kundi tað verið skipað soleiðis, at tað sum verður sett av til høvuðsumvæling verður støðlað í t.d. Landsbankanum at hava til at taka til í verri tíðum.

Nevnt verður í hoyringsframløguni møguleikan fyri einum bygningsstyrelse. Her er at viðmerkja, at fólkatalið í Føroyum er lítið og at tað er avmarkað hvat er tókt av fólki við serkunnleika. Heldur enn at at býta hesi upp á ymsar stovnar, so er helst betri at býta uppgávurnar hjá einum bygningsstyrelse millum stjórnaráðið og Landsverk.

## Niðurstøða

Nevndin í Arkitektafelagnum metir at møguleiki 1, við teimum viðmerkingum og uppskotum til dagføringum, sum felagið hevur gjørt, er tann, sum best kann røkka málinum. Her hava vit eisini ein góðan varhuga av, at tey viðurskifti, sum ein hevur ætlað at leggja dent á í møguleika 2 og 3, á ein betri hátt kunnu røkjast innan møguleika 1.

Vinarlig heilsan

Vegna nevndina í Arkitektafelag Føroya

Tórálvur Weihe

aðalskrivari

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgmansskrivstovan
Bústaður
110 Tórshavn

5. september 2023
Mál: 23/17592-2
Viðgjørt: PGH

**Hoyringarsvar í sambandi við almennar byggiverkætlanir**

Løgmansskrivstovan hevur tann 25. august 2023 sent upprit og framløgu um endurskoðan av skipan til almennar byggiverkætlanir til hoyringar.

Í uppritinum verða 3 møguligar loysnir greinaðar:

1. Verandi skipan – við dagføringum
2. Ábyrgdin aftur til einstøku stjórnarráðini
3. Eitt stjórnarráð, sum hevur alla ábyrgdina

Sum víst verður á í uppritinum og framløguni eru fyrimunir og vansar við øllum møguleikum. Niðanfyri verður greitt frá, hvørji sjónarmið Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur í mun til uppskotini. Sjónarmiðini eru grundað á tær royndir, sum ráðið hevur frá nógvum ymsum byggiverkætlanum seinni árini.

Glasir er tann byggiverkætlanin, sum hevur fylt mest hjá okkum, og hevur hon ofta verið tikin fram sum eitt dømi um eina verkætlan, har stýringin ikki hevur verið væl eydnað. Tað eru nógvar orsøkir til, at henda verkætlan ikki hilnaðist betur. At so H-bygningurin á Landssjúkrahúsinum í stóran mun er komin inn í somu óhepnu gongd, er harmuligt, men vónandi er hetta tí, at hesar báðar verkætlanirnar hava verið bygdar um somu tíð, og tí hevur ikki verið møguligt at lært av teirri fyrru verkætlanini í nóg stóran mun. Tað tykist tó sum stórur lærdómur er komin burturúr hesum báðum verkætlanunum, tó at tað er ov tíðliga at siga enn við vissu.

Uppritið snýr seg aleina um tey yvirskipaðu bygnaðarligu viðurskiftini í sambandi við byggiverkætlanir. Tað kemur eisini fram í metingini av fyrimunum og vansum, at eingin av hesum skipanum loysir alt.

Fyri at finna eina loysn, er neyðugt at taka atlit til serliga trý viðurskifti:

1. Innlit og umboðan av fakøkinum, sum byggjast skal til
2. Byggifaklig vitan og stýring av byggiverkætlanum
3. Politisk ábyrgd fyri byggiverkætlanini

Tørvurin á byggiverkætlanum kemur frá samfelagsligum fakøkjum, sum ikki hava nøktandi umstøður. Tað er ofta ein lang tilgongd, áðrenn tað kemur har til, at avgjørt verður at fara undir eina byggiverkætlan. Tað skal eitt stórt politiskt beinarbeiði til og taktiskt snildi. Samskifti við fakøkið, sum byggjast skal til, er gjøgnum stjóranarráðið, sum varðar av givna fakøkinum. Tað er tí avvarðandi landsstýrisfólk, sum hevur politiska ábyrgd av viðurskiftunum innan givna øki. Tað er hesin, sum skal royna at sannføra onnur í politisku skipanini um, at givna verkætlanin er tann rætta at fara undir.

At standa fyri eini byggiverkætlan er ein krevjandi uppgáva, sum krevur byggifakligt innlit og royndir frá skipan og stýring av byggiverkætlanum. Herundir eisini fíggjarlig stýring. Tað er neyvan skynsamt at petta virksemisøkið sundur, tí eitt fakligt umhvørvi er avgerandi fyri, hvussu hetta virkar. Tað ræður um at fáa eitt vælvirkandi byggifakligt starvsøki, har fólk trívast og støðast. Tað er tann menniskjaliga vitanin og hugburðurin, sum er avgerandi fyri, hvussu organisatiónin virkar.

Tað seinasta høvuðsatlitið er politiska ábyrgdin fyri byggiverkætlanini. Tað má verða greitt, hvør hevur politisku ábyrgdina og at tey neyðugu amboðini eru tøk fyri at handheva hesa ábyrgd. Her er spurningurin, um tað er tað sama landsstýrisfólki, sum hevur ábyrgd av fakøkinum, sum eisini skal hava ábyrgd av byggiverkætlanini. Ella um tað er landsstýrisfólkið, sum varðar av Landsverki, sum skal hava ábyrgd av øllum byggiverkætlanum hjá landinum.

Út frá hesum atlitum ber til at viðgera uppskotini hjá arbeiðsbólkinum.

Eftir okkara meting er møguleiki 2 ikki skynsamur. Tað er ikki skilagott, at byggiverkætlanir verða fluttar út í stjórnarráðini at verða stýrd. At standa fyri eini byggiverkætlan er ikki ein vitan, sum stjórnarráðini, hvør í sínum lagi, skulu byggja upp. Óansæð um tað ber til at keypa sær ekspertisu uttanífrá, so er neyðugt at hava fakligt innlit fyri at kunna samskifta við hesar ráðgevar. Tað fer at ganga út yvir kjarnuvirksemi, sum stjórnarráðini skulu hava, nevniliga at varða av menningini og yvirskipaðu fakliga og løgfrøðiliga eftirlitinum innan fyri givna politikkøki. Um hvørt ráð skal byggja upp fakliga vitan innan bygging til egnar stovnar, so er talan um nakað heilt annað enn kjarnuvirksemið.

Møguleiki 1 og møguleiki 3 líkjast í ein ávísan mun. Í báðum førum krevst, at eitt samband er millum Landsverk sum byggimyndugleika og fakmálaráðið, sum bygt verður fyri. Antin tað er fakmálaráðið, sum hevur fíggjarligu ábyrgdina, ella tað er ráðið, sum varðar av bygging, sum hevur ábyrgdina, so krevur hetta eitt væl skipað samstarv.

Hetta kann gerast við stýrisbólkum, sum Landsverk og Barna- og útbúgvingarmálaráðið eru farin undir at skipa í trimum byggiverkætlanum, sum júst eru farnar í gongd. Hesar eru Miðnám á Kambsdali, Rásin og Kampus. Í øllum trimum verkætlanum eru tað 3 persónar, sum eru umboðaðir í stýrisbólkinum. Umboð fyri fakmálaráðið, umboð fyri Landsverk og umboð fyri leiðsluna á stovninum, sum bygt verður til. Forfólkið í stýrisbólkinum er frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnmum, tí tað eru vit, sum hava høvuðsábyrgdina politiskt. Hetta er tí játtanin er játtað til grein 7 á fíggjarlógini. Hetta vil verða loysnin, um møguleiki 1 verður brúktur. Stýrisbólkurin møtist einaferð um mánaðin og fíggjarliga gongdin skal gjøgnumgangast á hvørjum fundi.

Henda skipan kundi eisini verði brúkt um so var, at møguleiki 3 var valdur. Tað er framvegis týdningarmikið, at ráðið, sum hevur fakábyrgd, fylgir væl við í byggingini og tryggjar sær, at úrslitið nøktar tørvin, sum bygt verður til. Um øll játtanin til byggivirksemi verður løgd til Fiski- og samferðslumálaráðið, so verður neyðugt hjá hesum ráðnum at fylgja betur við, hvat fer fram í Landsverki. Tað kundi kanska verið ein fyrimunur, tá ið vit hugsað um royndirnar, vit hava frá Glasi og H-bygninginum. Kanska hevði tað verið ein fyrimunur, at størri politisk ábyrgd lá hjá tí, sum varðar av Landsverki. Fakmálaráðini hava ikki havt møguleika til at stýra Landsverk, og tað hevur onkuntíð verið ógreiða um ábyrgdarbýtið. Hetta kundi verið greiðari við møguleika 3.

Tinghúsvegur 7 • FO-100 Tórshavn • Tel: +298 306500 • bumr@bumr.fo

Tað er bara umráðandi, at fakmálaráðini ikki verða hektað av við eini slíkari umlegging. Tað er líka so týdningarmikið, at gott samskifti er við "kundan", sum bygt verður fyri. Helst kann Bygningsstyrelsen í Danmark verða ein fyrimynd, sum vit høvdu kunna lært nakað av.

Vinarliga heilsan

Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Poul Geert Hansen
*aðalstjóri*

Tórshavn, 20. September 2023

## Viðvíkjandi hoyring um almennar byggiverkætlanir

Bústaðir takka fyri høvi at koma á fund við arbeiðsbólkin at umrøða tilmæli um, hvussu skipanin skal vera við almennum byggiverkætlanum framyvir. Fundurin hevur júst verið, og hava Bústaðir lova í stuttum at senda nakrar skrivligar viðmerkingar í tráð við tí sum var frammi á fundinum.

Bústaðir hava framt einar 40 verkætlanir tey seinastu 10 árini, og hava í dag 440 leigumál kring alt landið. Tað er tó ringt at samanbera hesar verkætlanir við tær stóru og rættuliga kompliseraðu verkætlaninar sum Landsverk hevur havt um hendi, við t.d. Glasir og H-bygninginum. Verkætlanirnar hjá Bústøðum eru flestar lítlar og einfaldar, soleiðis at skilja, at talan er um endurtøkur av øðrum byggjaríum og um fleiri íbúðir av sama slag í einum býlingi. Kortini hesar viðmerkingar:

1. Av teimum lýstu alternativu skipanum meta vit at verandi skipan – við dagføringum, er tann besti. Orsøkin er einahelst, at Landsverk hevur – ella eigur at hava, tær neyðugu førleikarnir og royndirnar til at kunna fyriskipa og stýra teimum byggiverkætlanum sum talan er um. Byggiharraráðgeving og verkætlanarstýring á einum høgum fakligum støði kann best fáast til vega við at miðsavna hetta virksemi í eina eind.
   Um vansarnir sum eru nevndar í tilfarinum, um fíggjarlig ábyrgd, um leiðsla og ábyrgd og um eftirlitsskyldurnar hjá landsstýrisfólki, so meta vit at tað er ein spurningur um at hava røttu mannagongdirnar og tey røttu fólkini á røttum stað.
2. At fleiri stórar verkætlanir ikki hava gingið so væl sum ætla, kann, umframt feilir og manglar hjá Landsverk, hjá ráðgevum ella hjá byggiharranum, í nøkrum førum skyldast, at verkætlanirnar verða undirbudgetteraðar. Hetta soleiðis, at kostnaðarmetingar og harvið játtanir eru ov lágar frá byrjan, og so vilja trupulleikarnir  koma fram seinni.
3. Ein onnur orsøk til at verkætlanirnar ikki altíð ganga so gott, sum ynskt verður, kann standast av, at verkætlanirnar verða streklar yvir eitt ov langt tíðarskeið. Jú longri ein verkætlan er ígongd, jú størri er vandin fyri, at kostnaðarmetingarnar ikki halda. Helst í teimum førum har broytingar í verkætlanini taka seg upp, meðan arbeitt verður.

Hinvegin talar nakað fyri, at ábyrgd, leiðsla og eigaraskapur eigur at fylgjast at. Tað kundi tala fyri seinna uppskotið sum er nevnt í tilfarinum. Tó meta vit, at avbjóðingin her verður at hava eitt nóg gott fakligt umhvørvi í aðalráðunum hvørt sær, og at savna tí fakligu tyngdina sum er neyðug.

Royndirnar sum Bústaðir hava, tala fyri:

a. At verkætlanir verða gjøgnumførdar yvir so stutt tíðarskeið sum gjørligt
b. At so fáar broytingar í verkætlanina sum gjørligt verða framdar aftaná at arbeiðstakarasáttmálar eru gjørdar
c. At tað er ein styrki, at Bústaðir bæði er byggiharri, luttekur aktivt í verkætlanina og eigur byggjaríið tá ið tað er liðugt
d. At allar verkætlanir eru skipaðar við byggifundum, uppfylging, rapportering, avstemman og samanhangandi tíðar- og gjaldsætlanum
e. At størri verkætlanir harumframt altíð verða skipaðar við einum stýrisbólki við arbeiðstakara, byggiharraráðgeva og byggiharra, til tess neyvt at fylgja gongdina og at taka neyðug stig, um frávik taka seg upp.

Bústaðir t. 20. September 2023
Andras Róin, stjóri

**Skipan av byggiumsiting á Landsverki**

Tá ið byggiumsitingin varð skipað á Landsverki fyrst í hesum ártúsindinum, varð Gjaldstovan skeptisk yvir, hvussu hetta varð skipað.

Vit førdu tá fram fyrst og fremst ógreitt ábyrgdarbýti bæði hvat viðvíkti búskapi og organisering. Vald og gjald, eiga at fylgjast.

Hinvegin varð Gjaldstovan ikki ósamd í, at tað er skilagott, at vit í hesum lítla landinum, samskipa tingini betri, tí nógvir stovnsleiðarar koma kanska einaferð í lívinum út fyri eini almennari byggiætlan. Tá hildu vit, at Modell 3 var tað rættasta.

Fyri at taka eina paralell, so er júst tað sum Landsverk ger, á einum øðrum spori eksistensgrundarlagið undir Gjaldstovuni, at alt tað sum eitur kt-infrastrukturur so ella so er lagt undir Gjaldstovuna. Her kunnu vit nevna, Skjalahald, Vangan, Bsl, Landsnet, Skulanet, Heldina, Samleikan. Vit kenna eisini almennu fyrisitingina væl, so í staðin fyri at útvikla ein komponent, so heldur mæla til at avtaka eina inneffektiva skipan. Vit kunnu eisini tryggja tvørfaklig atlit sum eina longu menta gjaldsloysn, ella longu ment api ella endurnýtslu av lisensum og pallum.

Eitt annað týdningarmikið element er, at vit hava sett okkum fyri, at veita so nógv út sum til ber. Tá ið vit yvirtóku Landsnet, tóku vit avgerð um at avviklað rakstrarsentrið og veita alt út. Ditto BSL. Vit veita so at siga nógv út, men tað eru kreftir, sum vilja gera tingini in house. Hví, tí tað í nógvum verkætlanum verður flutt so ótrúliga nógv vitan úr organisatiónunum. Tí er tað alla tíðina ein javnvágargongd millum hvat skal verða veitt út og hvat skal verða gjørt inhouse.

Vit halda ikki, at tá ið vit tosa um fakskipanir, sum nýggja EPJ ella Taksskipanir, at vit skulu valda, heldur ikki gjalda. Her halda vit, at vit eiga at stuðla uppundir við Verkætlanarleiðslu, menningarmyndlum, infrakervi, arkitekturi, standardum. T.d. eru vit longu nógv inni í EPJ verkætlanini, men vit hava ikki ábyrgd av verkætlanini

Hvussu kunnu vit so yvirføra hesar meginreglurnar til Landsverk.

Tað er týdningarmikið við einum myndugleika sum kann tryggja:

- at vit fáa "nokk" fyri pengarnar.
- nøktandi tilgongdir til eina verkætlan
- sáttmálaviðurskifti og løgfrøði
- meting av verkætlanum
- verkætlanarleiðslu
- meginreglur fyri bæði einum og øðrum sum umhvørvisviðurskifti og tøkni

- Nøktandi góðsku

Landsverk eigur at bjóða út (í størsta mun) projektleiðslu, projekteringsleiðslu, byggiskráir og byggileiðslu.

Vit halda, at tá ið tað kemur til djúpt kompleksar fakliga bygningar, sum eitt hospital, at Landsverk ikki eigur at vera byggiharri, men eigur at tryggja faklig viðurskifti.

Eitt annað dømi kann vera útbyggingin av laboratorinum hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni

Hvar gongur so markið millum ein kompleksan fakligan bygning og ein bygning. Ein skúli er ikki ein fakliga kompleksur bygningur, heldur ikki ein skrivstovubygningur. Forsorgarstovnar neyvan fakliga kompleksir bygningar.

Summa summarum, tosa vit um eina kombinatión av myndlunum 1 og 2.

Løgmansskrivstovan
Postbox 64Tinganes
110 Tórshavn

7. september 2023
**Mál**: 23/17237-3
**Tygara Skriv**: 24. aug. 2023
**Viðgjørt**: -

**Hoyring í samband við almennar byggiverkætlanir**
Heilsumálaráðið hevur við telduposti 24. august 2023 fingið sendandi til hoyringar kunning og tilfar í samband við arbeiðið, sum nú verður gjørd í samband við almennar byggiverkætlanir.

Tit greiða frá at í stuttum snýr arbeiðið seg um, at Landstýrið hevur sett ein arbeiðsbólk, ið skal koma við tilmælum um, hvussu skipanin skal vera við almennum byggiverkætlanum framyvir.

Arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum verður lagt soleiðis til rættis, at bólkurin eyðmerkir møguleikar til bygnaðarliga skipan av almennum byggiverkætlanum. Síðani verður skipað fyri umførum við hoyringum saman við viðkomandi pørtum og interresentum.

Tað er í hesum sambandi, at Heilsumálaráðið er boðið við í tilgongdina sum hoyringspartur.

Viðheft var:

- Fylgibræv, ið greiðir frá tilgongdini og tíðarfreistum hjá hoyringspørtum
- Upprit, ið greiðir frá grundarlagnum undir arbeiðinum og arbeiðstilgongdini
- Framløga, ið eyðmerkir tríggjar møguleikar hjá hoyringspørtum at taka støði í

Heilsumálaráðið hevur her niðanfyri endurgivið møguleikarnar og sett sína viðmerking niðanfyri.

***Møguleiki 1: Verandi skipan – við dagføringum***
Sum støðan er við núverandi skipan, hava einstøku aðalráðini ábyrgd av verkætlanini, biðja Løgtingið um fígging og hava Landsverk, sum byggiharra.

Grundarlagið fyri skipanini var at miðsavna alla byggiharraráðgeving í einum stovni.

Fyrimunir við skipanini er, at ein miðsavna byggiharraráðgeving í einum stovni gevur møguleika at byggja upp eina tekniska umsiting við fakligum førleika á høgum stigi og eisini

verður lagt upp til ein bygnað við verkætlanarstýring, ið kann taka sær av stórum byggiverkætlanum.

Vansar við verandi skipan eru, at fíggjarliga ábyrgdin og leiðslan av byggiverkætlanunum ikki hevur verið nóg greið. Av hesum sama hava landstýrisfólk trupult við at halda sínar eftirlitsskyldur.

Arbeitt verður við dagføringum í galdandi arbeiðsskipan og mannagongdum, sum lofta vansum í skipanini og tryggjar eitt greiðari ábyrgdarbýti millum ánara og byggiharra. Í seinastu verkætlunum er stýrisbólkur settur, sum skal stýra verkætlanini. Umboð fyri bæði ánara og byggiharra hava verið umboðað í stýrisbólkinum. Tað hevur stóran týdning, at verkætlanir eru neyvt fyrireikaðar, áðrenn boðið verður út. Landsverk og Fíggjarmálaráðið arbeiða við einum rundskrivi, har øll tilgongdin við almennum byggiverkætlanum er lýst.

***Viðmerking***
Heilsumálaráðið heldur, at tað ber til at arbeiða víðari við hesum møguleika við dagføringum. Herundir við mannagongdum fyri, hvussu fakøkir vera tikin meiri við o.a., serliga tá ið talan er um kompleksar verkætlanir.

***Møguleiki 2: Ábyrgdin aftur til einstøku stjórnarráðini***
Ein møguleiki er, at ábyrgdin av almennum byggiverkætlanum verður løgd aftur til einstøku ráðini soleiðis, at hvørt stjórnarráð sjálvt stendur fyri bygging av bygningum. Hetta kann eitt nú skipast við tekniskum ábyrgdarum í ráðunum, sum hava ábyrgdina og eru við í bygginevndum. Stjórnarráðið ger avtalu um samstarv við uttanhýsis byggiharraráðgevar, sum síðani taka sær av byggiharraráðgeving og verkætlanarstýringini.

Loysnin innber eitt greitt arbeiðsbýti, har landstýrisfólkið, ið fær játtanina, stendur fyri byggingini og hevur fíggjarliga og fakliga ábyrgd av verkætlanini. Við hesum bygnaði er greitt hvør hevur leiðslu og ábyrgd av byggiverkætlanini, og landsstýrisfólk hava, av hesum sama, betri fortreytir fyri at halda sínar eftirlitsskyldur.

Vansar við loysnini eru, at hvørt ráð byggir upp egna serfrøði í mun til leiðslu av større byggiverkætlanum og samstarv við uttanhýsis byggiharraráðgevar. Hetta kann merkja, at systemvitan hvørvur, og at skipanin, í størri mun, verður persónsbundin.

**Viðmerking:**
Heilsumálaráðið heldur at ráðið hevði kunna lagt uppgávuna at skipa byggivirksemi í Sjúkrahúsverkið. Neyðugt hevði tá verið at fingið starvsfólk til økið. Hetta er ein loysn, ið møguliga ikki hóskar seg til onnur. Talan kundi eisini verið um eina differentieraða loysn, millum loysn 1 og 2, tá ið talan er um kompleksar byggiverkætlanir.

***Møguleiki 3: Eitt stjórnarráð, sum hevur alla ábyrgdina***
Ein triði møguleiki er, at øll ábyrgd av almennum byggiverkætlanum verður løgd í eitt ráð. Hetta ráð hevur síðani ein undirliggjandi stovn við sterkari, fakligari vitan innan byggharraráðgeving. Tá ið almennar byggiverkætlanir skulu gerast, tekur stovnurin sær av allari byggingini. Tá ið bygningurin er liðugur, verður bygningurin latin aftur til ábyrgdaran av bygninginum, annaðhvørt til ogns ella láns.

Bygnaðurin leggur upp til, at býtið millum leiðslu og ábyrgd er greitt, umframt at allir leiklutir í verkætlanini eru greiðir.

Vansin við loysnini er, at ein frástøða verður millum eigara av byggingini og tann, ið hevur ábyrgdina. Hetta kann møguliga hava ávirkan javnvágina millum interresentar, byggiharra og ábyrgdarhavaran.

***Viðmerking:***
Heilsumálaráðið heldur at hetta er ein loysn, ið hevur fleiri vansar enn fyrimunir við sær. Sjúkrahúsverkið verður t.d. framhaldandi noytt at hava byggitekniskar førleikar, ikki bert til dagligt viðlíkahald, men eisini fyri at kunna tryggja, at sjúkrahúsverkið dagliga verður rikið tekniskt forsvarliga, Henda vitan eigur sjálvsagt at verða tikin við, tá ið talan er um byggiverkætlanir.

**Annað**
*Búskaparskipan landsins* er bygd upp eftir eini stigveldisskipan, ið er stirvin á tann hátt, at tá ið Landsverk stendur sum stovnsleiðari, ber illa til hjá øðrum at síggja eitt stovnsnummar. Um hetta var møguligt hevði borið til at fylgt við, m.a. hvussu nógv er brúkt av játtanini.

Vinaliga

Heilsumálaráðið

12. september 2023

# Hoyringarsvar frá Landsverki til upprit um skipan av almennum byggiverkætlanum

Fyrst skal viðmerkjast, at uppskotini frá arbeiðsbólkinum leggja einans upp til at gera broytingar í ábyrgdarbýtinum í sambandi við almennar byggiverkætlanir, meðan tað ikki verður hugt eftir, hvat vit kunnu læra frá øðrum londum, og heldur ikki verður hugt eftir, hvat nýggjari gransking vísir hvussu ein kann stýra váðan í verkætlanum.

Fleiri av grannalondum okkara hava verið í somu støðu sum Føroyar, og hava seinastu 20 árini arbeitt miðvíst við at betra um kostnaðarmetingar og stýra váðan í sambandi við kostnað og tíð í almennum anlegs- og byggiverkætlanum. Fokus í hesum arbeiði er ikki so nógv ábyrgdarbýti, men tað snýr seg serliga um at arbeiða eftir ávísum leisti, ið stjórnin áleggur undirliggjandi myndugleikum at fylgja. (sí skjal 1)

**Verandi skipan**
Núverandi leiðsla á Landsverk tók við í kjalarvørðinum á byggiverkætlanini Glasir. Fyrsta uppgávan hjá nýggju leiðsluni var at endurhugsa stovnin, og kanska serliga í mun til almennar byggiverkætlanir. Frágreiðing frá leiðsluni var latin landsstýrinum í juni 2020 við tilmæli um ítøkiligar broytingar innanhýsis á Landsverki, og við tilmælum til politiska myndugleikan.

Út frá hesum hevur Landsverk miðvíst arbeitt við at menna eina skipan við betri amboðum og tilgongd til verkætlanar- og fíggjarstýring, controlling, váðametingum, førleikamenning, nøktandi verkætlanargrundarlagi og vavi, verkætlanarleisti, talgildum amboðum v.m.
Eisini er ein tilgongd saman við Fíggjarmálaráðnum um eitt uppskot til rundskriv um bygging, sum leggur ein greiðan leist fyri samstarv millum Landsverk og stjórnarráðini, ið ynskja bygningar og anlegg. Í praksis eru fleiri stjórnarráð og Landsverk longu í holt við at virka við støði í uppskotinum um rundskriv um bygging.

Í fyrireikingini av øllum verkætlanum, sum eru settar í gongd aftaná 2020, er dentur lagdur á fyrireiking, leypandi váðametingar og neyva fíggjarstýring soleiðis, at Landsverk í dag støðugt hevur eina dagførda mynd av øllum teimum umleið 2,5 mia krónunum, sum eru settar í fleiri enn 70 ymiskar verkætlanir.

**Glasir og H-bygningurin hoyra til somu tíð**
Í frágreiðingini frá 2020 verður ítøkiliga greitt frá:

- *Landssjúkrahúsið, H-bygningurin – Aftur her endurtekur søgan seg, at bygging er byrjað uttan at eigari, brúkari og byggiharri eru samd um tørv, góðsku og kostnað. (Avbjóðingar og átøk, Landsverk, 2020)*

Hetta sást eisini aftur í frágreiðingini frá Landsgrannskoðanini, sum í stóran mun snúði seg um viðurskifti, sum gingu fyri seg fyri 2020, meðan broytingarnar innanhýsis á Landsverki er eftir 2020.

Landsverk vísti í frágreiðingini frá 2020 á, at tað er í fyrireikingarfasuni, at verkætlanir fara av kós:

- *Heitt verður á Landstýrið at tryggja, ella broyta siðvenju, soleiðis at ráðini gera síni krøv galdandi í byrjanini av stórum verkætlanum, tá virkislýsingin verður gjørd, fyri síðani at lata Landsverk røkja sína uppgávu sum byggiharri, uttan at ógreitt er, hvør situr við ábyrgd og ávísingarrætti í verkætlanum. Ábyrgd og heimildir mugu fylgjast at. (Avbjóðingar og átøk, Landsverk, 2020)*

Tá fyrst er farið undir at byggja er sera torført at gera broytingar í eini verkætlan uttan at kostnaður og tíðarætlan verða ávirkaði neiliga. Innbygdu veikleikarnir við verkætlanini fyri H-bygningin vístu seg tíðliga og eru síðani vorðnar heilt greiðar. Høvuðsveikleikarnir eru:

- Verkætlanin er broytt sera ofta og ógreitt var frá byrjan, hvat skuldi byggjast.
- Skiftandi lyklapersónar kenna seg ikki aftur í uppruna verkætlanini. Tað hevur havt við sær áhaldandi broytingar og ynski um betringar og møguleikar. Við stórum kostnaðarøkingum og seinkingum sum avleiðing.
- Kostnaðarmetingar og tíðarætlanir halda ikki, tí farið var ígongd uttan at verkætlanin var nóg væl fyrireikað.

At kostnaðarmetingar og tíðarætlanir ikki halda, er ikki bara eitt føroyskt fyribrigdi. Hetta er hinvegin kent um allan heimin og nógv granskað tey síðstu 50 árini. Ein tann leiðandi granskarin innan økið er danin Bent Flyvbjerg, sum eitt nú hevur skrivað eina vísindaliga grein við rámandi heitinum "Over Budget, Over Time, Over and Over Again: Managing Major Projects"[1]. Í hesi grein verður víst á, at tað serliga eru tvey viðurskifti, sum gera seg galdandi viðvíkjandi vantandi avrik innan metingar: bjartskygdur skeivleiki (optimism bias) og strategisk avskeplan (strategic misrepresentation).

Bjartskygdur skeivleiki er, at vit í fyrireikingini av verkætlanum eru ov bjartskygd og ikki leggja upp fyri teimum óvissum, sum kunnu vera í einari verkætlan. Strategisk avskeplan er hinvegin, tá ið ein í avgerðartilgongdini tilvitað yvirmetir ágóðan og undirmetir kostnaðin av

[1] Flyvbjerg, 2011. Over Budget, Over Time, Over and Over Again: Managing Major Projects. ResearchGate.

verkætlanini fyri at fáa hana setta í verk. Ímeðan tann fyrra orsøkin er sálarfrøðilig, so er tann seinna politisk.

Bretland og Noreg eru tvey lond, sum hava sett ítøkilig tiltøk í verk fyri at eydnast betur við stórum byggiverkætlanum. Serliga er vert at leggja merki til nøkur átøk:

- Í Noregi verða allar verkætlanir fyrireikaðar og skipaðar í einari felags verkætlanarskipan við bæði budgettskipan og eftirmetingarskipan. Á henda hátt verða vitan, royndir og eftirmetingar savnaði.
- Í Bretlandi hevur skipanin Reference Case Forecast savnað lidnar verkætlanir, so til ber at læra av fortíðini og sleppa undan bjartskygda skeivleikanum. Við hesi skipan slepst í størri mun undan undirfíggjaðum verkætlanum.

Í tráð við hetta hevur Landsverk savnað saman søgulig tøl um tunnilsverkætlanir í Føroyum. Tað er stórur munur á prísmetingini og endaliga verklagskostnaðinum, og tað er líka mikið um verkætlanin er almenn ella privat. (sí skjal 2)

Hesi tøl benda á, at somu veikleikar, sum normenn og bretar hava staðfest, finnast í Føroyum. Tí snýr tað seg um at gera veruligar váðametingar, at hava eitt sterkt fakligt fjølbroytni, sum byggir skipanir upp og, at hava eyguni opin, tá kostnaðar- og tíðarætlanir verða lagdar.

**Støðan á Landsverki**
Tað er júst tann tilgongdin, sum Landsverk hevur lagt seg eftir, síðani 2020. Fíggjarstýringin er flutt yvir í Microsoft Dynamics (Navision), sum er eitt munandi tryggari, aktivari og sterkari fíggjarstýringsamboð. Ein óheft controllarafunktión er sett á stovn.

Eitt fjølbroytt og fakliga sterkt umhvørvi er skipað á Verkætlanardeildini, sum umsitur allar verkætlanir á Landsverki. Starvsfólkini á deildini arbeiða eftir sama verkætlanarleisti, í somu skipanum og kunnu arbeiða uppá tvørs við ymsum verkætlanum og deildum. Úrslitið er, at einhvør verkætlan hevur atgongd til eitt munandi sterkari fakligt umhvørvi við verkfrøðingum, byggifrøðingum, løgfrøðingum, fyrisitingarfólki, arkitektum, búskaparfrøðingum og maskinmeistarum. Eitt fakligt umhvørvi, sum megnar at seta seg inn í kompleksar verkætlanir, síggja veikleikar og avbjóðingar og ikki minst hava eitt javnbjóðis samstarv við uttanhýsis ráðgeving.

**Tilmæli**
Vísandi til omanfyristandandi mælir Landsverk til at hildið verður fram við tí skipan vit kenna í dag. Hetta er bygnaðarliga sama skipan, sum í Noregi, har tey hava góðar royndir at minka um váðan í almennum byggiverkætlanum. Mælt verður til at Fíggjarmálaráðið, Fiskvinnu- og samferðslumálaráðið og Landsverk fara undir at gera ein leist til at fyrireika verkætlanir eftir, eins og gjørt er í okkara grannalondum.

Viðvíkjandi møguleika 2, so vil Landsverk vísa á, at hendan bygnaðarliga skipanin er roynd áður og farið var frá henni.

Viðvíkjandi møguleika 3, so vil henda skipanin ábyrgdarliga helst vera nakað greiðari í mun til ábyrgd hjá einstaka landsstýrisfólkinum, men alt ov stór fjarstøða verður frá tí, sum skal brúka stovnin og tí sum skal byggja. Ein tílík skipan, sum møguleiki 3, finst ikki í nøkrum av okkara grannalondum og tað er tískil ikki rætt, sum stendur í uppritinum, at møguleiki 3 er skipanin í Danmark.
Í Danmark er Bygningsstyrelsen skipað við tveimum modellum, annað, ið minnir nógv um tað í FO og hitt sonevnda SEA-modellið, har Bygningsstyrelsen er tænastuveitari av leigumálum og útvegar hesi antin, sum nýbygging ella finnur leigumál.

Vinarliga

Sigurd L. Lamhauge, stjóri

*Fylgiskjal 1*

**Stutt samanumtøka av royndum hjá nøkrum av grannalondum okkara**

Fleiri av grannalondum okkara hava verið í somu støðu sum Føroyar, og hava seinastu 20 árini arbeitt miðvíst við at betra um kostnaðarmetingar og stýra váðan í sambandi við kostnað og tíð í almennum anlegs- og byggiverkætlanum. Fokus í hesum arbeiði er ikki so nógv ábyrgdarbýti, men tað snýr seg serliga um at arbeiða eftir ávísum leisti, ið stjórnin áleggur undirliggjandi myndugleikum at fylgja

Noreg er helst tað landið, sum er komið longst. Har hava tey síðani 1999 havt ein fastan hátt at meta um kostnað og tíð. Norðmenn fingu íblástur frá Steen Licthenberg, ið var professari á DTU. Hansara høvuðsverk er bókin "Proactive Management of Uncertainty using the Successive Principle."

Ein eftirmeting í 2019 av byggiverkætlanum hjá norska statinum vísti, at 80 prosent av 91 kannaðum byggiverkætlanum fyri tilsamans 110 milliardir norskar krónur komu á mál undir kostnaðarmeting.

Í Onglandi hevur stjórnin álagt øllum myndugleikum at meta um váðan við at nýta ein hátt, ið nevnist Reference Case Forecast. Upphavsmaður er áðurnevndi Bent Flyvbjerg. Hann var professari á Oxford og hann menti háttin, meðan hann virkaði sum ráðgevi fyri táverandi bretska fíggjarmálaráðharran Gordon Brown. Royndir vísa, at við at nýta hendan háttin ber til at fáa rættuliga neyvar og haldbarar forsagnir um tíð og kostnað.

Við íblástri frá góðu úrslitunum í Noregi og Onglandi menti Trafikministeriet í Danmark í 2006 háttin "Ny Anlægsbudgettering[2]", sum verður nýttur av eitt nú Vejdirektoratet. Ein eftirmeting av 38 verkætlanum innan vegagerð hjá Vejdirektoratet vísti, at verkætlanirnar í miðal kostaðu 7 prosent minni enn kostnaðarætlanin.

At enda vísir nýggj frágreiðing hjá svenska Trafikverket, at ein fær tær mest álítandi forsagnirnar um ein samantvinnar Reference Case Forecasting og norsku skipanina við successivum prinsippum [3].

---

[2] Hovednotatet for Ny Anlægsbudgettering

[3] Sí nærri "*Fagfolk langer ud efter byggestyring: Danmark kører store offentlige projekter amatøragtigt*", grein í Ingeniøren frá 17. marts 2023 og "*Norge benytter byggestyringsmodel, vi kan lære af: Værktøjet sparede milliarder*", grein í Ingeniøren 19. mars 2023

*Fylgiskjal 2*

## Talva yvir frávik av prísmeting og verklagskostnaði í mió. kr.

| Prísstøði | Prísmeting (SFÆ) 1999 | 2006 | 2012 | 2018 | Framroknað* | Verklag 2000 | 2003 | 2006 | 2016 | 2021 | Frávik Nominel | Real | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Verkætlan** | | | | | | | | | | | | | |
| Vágatunnilin | 206 | | | | 216 | 295 | | | | | 43% | 36% | |
| Norðoyatunnilin | 260 | | | | 2316 | | 395 | | | | 52% | 25% | |
| Hovstunnilin | 95 | | | | 134 | | | 166 | | | 75% | 24% | 29% |
| Hvalbiartunnilin | | 155 | | | 219 | | | | 250 | | 61% | 14% | |
| Eysturoyartunnilin | | 953 | | | 1.349 | | | | 1.540 | | 62% | 14% | |
| Tunlar Norður um Fjall | | 251 | | | 419 | | | | | 522 | 108% | 25% | |
| Sandoyartunnilin | | 661 | | | 1.102 | | | | | 1.300 | 97% | 18% | 18% |
| Eysturoyartunnilin | | | 1.130 | | 1.267 | | | | 1.540 | | 36% | 22% | |
| Hvalbiartunnilin | | | 170 | | 191 | | | | 250 | | 47% | 31% | |
| Tunlar Norður um Fjall | | | 265 | | 350 | | | | | 522 | 97% | 49% | |
| Sandoyartunnilin | | | 800 | | 1.057 | | | | | 1.300 | 63% | 23% | 31% |
| Tunlar Norður um Fjall | | | | 393 | 430 | | | | | 522 | 33% | 21% | |
| Sandoyartunnilin | | | | 1.000 | 1.095 | | | | | 1.300 | 30% | 19% | 20% |
| **Miðal** | **4** | **12,5** | **6** | **3** | | | | | | | **62%** | **25%** | |

**formil: FV=PV*(1+donsk vinnuindekstøl)^t*

***Kelda:** Landsverk*

Løgmansskrivstovan
Tinganes
FO-100 Tórshavn

Journalnr.: 1/eb
Dagfesting: 05-09-2023

**Hoyringsskriv í sambandi við almennar byggiverkætlanir**

## Stutt um RÁÐ

RÁÐ varð stovnað í 2011 við tí høvuðsendamáli, at arbeiða við byggiharraráðgeving/verkætlanarleiðslu og leiðslu innan byggivinnu generelt. Av tí at byggiharraráðgeving eisini umfatar ger og umsiting av ráðgevarasáttmálum, hevur RÁÐ higartil valt ikki at fáast stórvegis við prosjektering av verkætlanum. Eisini vísa royndir, at best er, at byggileiðsla og fakeftirlit eru atskild í størri verkætlanum, av tí at byggileiðslan skal samskipa fakeftirlitið. Somuleiðis er best, at byggileiðsla og projektering eru atskild, av tí at byggileiðslan skal samskipa projektuppfylging (projektering) og taka støðu til ósamsvar millum projektering og útinning, herundir taka støðu til feilir og manglar í projektinum.

RÁÐ hevur í sínum 12 ára virki verið knýtt at nógvum stórum verkætlanum í Føroym m.a.:

| | |
|---|---|
| Eysturoyartunnilin: | Verkætlanarleiðsla |
| Sandoyartunnilin: | Verkætlanarleiðsla |
| Skúlin á Fløtum: | Byggiharraráðgeving og byggileiðsla |
| Smoltstøð í Glyvradali: | Verkætlanarleiðsla |
| Smoltstøð á Norðtoftum: | Verkætlanarleiðsla |
| Smoltstøð í Skálavík: | Verkætlanarleiðsla |
| Smoltstøðir í Skotlandi | Byggiharraráðgeving |
| Bakkafrost | Verkætlanarleiðsla - komandi verkætlanir |
| Simulatorbygningur hjá Atlantic Airways: | Byggiharraráðgeving og byggileiðsla |
| Farstøðin á Flogvøllinum í 2014: | Verkætlanarleiðsla |
| Skúlin á Skúlatrøð: | Verkætlanarleiðsla og byggileiðsla |
| Skúlin á Giljanesi: | Verkætlanarleiðsla og byggileiðsla |
| Barnagarður í Gøtu: | Verkætlanarleiðsla og byggileiðsla |
| Føroya banki - høvuðssetur | Verkætlanarleiðsla og byggileiðsla |
| Bylgjan í Runavík | Verkætlanarleiðsla og byggileiðsla |
| Útbygging av Havsbrún | Byggiharraráðgeving |
| Eldraheim á Stórubrekku | Byggiharraráðgeving og byggileiðsla |

Í løtuni starvast 4 civilverkfrøðingar í fyritøkuni við drúgvum royndum.

## Viðmerkingar til møguleika 1
Sum tað framgongur, hevur RÁÐ ikki arbeitt stórvegis við byggiharraráðgeving fyri Landsverk, og kann tí ikki beinleiðis meta um verandi skipan.
Hinvegin kunnu vit út frá royndum gera nakrar generellar viðmerkingar.

At síggja til, er veikleikin við verandi skipan, at ábyrgdarbýtið tykist ógreitt, eftirsum einstøku aðalráðini, (arbeiðsánararnir), sita við fíggjarligu ábyrgdini, meðan stýringin av verkætlanini (byggiharrin) liggur í einum stovni undir einum øðrum ráð. Orsaka av hesum verður frástøðan størri millum arbeiðsánara og prosjektið, og arbeiðsánarin hevur truplari við at fylgja við búskapinum í verkætlanini. Skipanin tykist fløkt og lítið smidlig, og hetta er helst ein vansi, tá viðurskifti í eini byggiverkætlan vanliga krevja rímiliga skjótar avgerðir. Oftani eydnast verkætlanir best, tá organisatiónin er einføld við greiðum ábyrgdum. Tað má verða púra greitt, at skyldur, heimildir og ábyrgd fylgjast.
Tað eigur at strembast eftir, at gera eitt organisatiónsdiagram við greiðum ábyrgdum uttan stiplaðar linjur. Somuleiðis er týdningarmikið at gera eina greiða byggiskrá við m.a. avmarkingum, ynskjum, krøvum, og fíggjarkarmi, áðrenn avtalað verður gjørd við prosjekterandi ráðgevar og arbeiðstakarar. Tað má vera púra greitt fyri arbeiðsánaranum, hvat er við í verkætlanini, og hvat ikki er við.

## Viðmerkingar til møguleika 2
Hendan loysnin hevur eitt greitt ábyrgdarbýti millum partarnar, og møguleikin fyri misskiljingum og feilum átti at verið minni. RÁÐ hevur góðar royndir við, at arbeiðsánarin og byggiharrin er tann sami, og er tað tann skipanin, sum er tann mest vanliga í teimum verkætlanum, sum RÁÐ hevur luttikið í. Hesin møguleiki gevur vanliga tann neyðuga fleksibilitetin, sum tørvur er á í byggimálum, tá tað eru fá løg og ómakaleysari at fáa avgerðir tiknar undir tí ábyrgd, sum partarnir hava fyri tíð, dygd, funktión og kostnaði.

## Viðmerkingar til møguleika 3
Møguleiki 3 minnir um møguleika 1 undantikið, at byggiharra ráðið hevur bæði fíggjarligu ábyrgdina og byggiharraleiklutin. At síggja til, verður frástøðan frá ráðnum við tørvinum á byggingini, og byggiharra ráðið/stovnin sum byggir, størri. Tvs at ráðið við tørvinum verður eitt slag av brúkarum við tørvi og ynskjum, meðan ráðið ið byggir hevur fulla ábyrgd av byggingini, og tekur tí avgerðir um ynskini skulu takast við ella ikki. Tað sama er galdandi um tørvurin broytist í byggitíðarskeiðinum, og støða skal takast til, um t.d. onkur tilkeyp høvdu verið hóskandi ella neyðug fyri at fáa nøktandi úrslit. Tað kann tí eisini gerast neyðugt við umraðfestingum fyri at fáa kostnaðin at halda, og tá er óiva ómakaleysari, um tann sum hevur tørvin, eisini hevur ábyrgdina av kostnaðinum og stýringini.
Í sambandi við spurningin um at uppbyggja eina almenna byggiorganisatión/stovn við serfrøði og royndum er vert at hava í huga, at ein slík deild og royndirnar avhanga av, hvør starvast á deildini, og hvussu stabil arbeiðsmegin er. Hetta merkir, at neyðugt er við støðugum fólkum við røttum útbúgvingum, yvir longri áramál. Um eitt slíkt umhvørvi skal eydnast, er neyðugt við nóg nógvum verkætlanum. Onkuntíð sæst ísv størri verkætlanir, at arbeiðsmegin byrjar at hyggja eftir øðrum størvum, tá verkætlanin lækkar móti endanum, og royndirnar fylgja við medarbeiðarunum.
Um avtala verður gjørd við eina fyritøku, er hon bundin av sáttmálanum til verkætlanin er liðug.

RÁÐ hevur góðar royndir við, at brúktar verða fyritøkur við serfrøði innan egin øki til stórar verkætlanir.

## Tilmæli

Út frá okkara royndum, er tað týdningarmikið at hava eina so einfalda byggiorganisatión sum gjørligt, har tað er møguligt at taka neyðugar avgerðir undir ábyrgd.

Ein einføld og ruddilig organisation kann í tráð við loysn 2 síggja soleiðis út:




Hóast yvirskipaða organisatiónin eigur at vera einføld og ruddilig, finnast fleiri møguleikar undir hesi skipan:

- Manning av bygginevnd við neyðugum lyklapersónum.
- Byggiharraráðgevi sum prosjektleiðari, ella prosjektleiðari settur av aðalráðnum sum fær stuðul frá byggiharraráðgeva.
- Arbeiðstøkuformur alt eftir hvat bygging talan er um.
- Osv.

Samanumtikið eigur ein verkætlan at vera skipað so einføld, sum til ber, og við greiðum ábyrgdarbýti. Somuleiðis eigur møguleikin fyri fleksibiliteti at vera til staðar, so avgerðir og støður kunnu takast rímiliga skjótt undir galdandi kørmum.

# ALMENNAR BYGGIVERKÆTLANIR

---

## Viðmerkingar til endurskoðan av skipan til almennar byggiverkætlanir

Ráðgevarfelagið tekur undir við, at verandi skipan verður eftirmett. Ein effektiv skipan økir um sannlíkindini fyri, at almennar byggiverkætlanir verða gjørdar til røttu góðskuna, at byggitíðin heldur og til avtalaðan kostnað.

Yvirskipað er okkara fatan, at privata ráðgevaravinnan hevur eydnast væl við at fasthalda fólk í vinnuni, harvið ment førleikar og bygt upp ein lutfalsliga høgan ancinitet innan ymisku fakøkini í ráðgevingarvinnuni. Við hesum í huga halda vit, at ein møgulig framtíðar skipan - fyrst og fremst skal miðsavna seg um førleikar innan útveiting. Tvs. at eitt tílíkt organ, fyrst og fremst skal taka sær av yvirskipað at allýsa eina møguliga verkætlan, soleiðis at hon er egnað til útbjóðing á privata ráðgevingar marknaðinum, innanfyri ein ávísan fíggjar- og tíðarkarm.

# BYGNAÐURIN

### Vit síggja almennu verkætlanirnar sum tveir høvuðsbólkar.

1. Annlegsverkætlanir, sum vegir, havnir og tunlar
   - Hesar virka uttan størri trupulleikar undir verandi skipan, har Landsverk hevur ábyrgdina av verkætlanum og viðlíkahaldi, sum eisini liggur í sama ráðið sum Landsverk.
2. Bygningsverkætlanir
   - Hesar eru meiri kompleksar og tengdar av ynskjum og krøvum frá brúkaranum. Royndir hava víst, at tað er sera krevjandi at leiða størri byggiverkætlanir sum setur stór krøv til førleikar, royndir og rættan hugburð til teir personar, sum skulu hava verkætlanar-, projekterings-, og byggileiðslu. Tað er umráðandi, at byggiharrin/verkætlanarleiðarin hevur neyðugar royndir og førleikar at leiða og stýra eina verkætlan frá byrjan til enda. Eisini er umráðandi, at skipanin er einkul við við fáum organisatiónsløgum, og at verkætlanarleiðslan hevur heimildir at taka avgerðir.

### Einfaldur bygnaður

Bygnaðurin eigur at verða so einfaldur sum gjørligt, soleiðis at tað ongantíð eru ivamál um hvør hevur ábyrgdina. Og so stuttur vegur til tey, sum skulu taka avgerðir, sum møguligt.

Ráðgevarfelagið tekur undir við, at verkætlanir verða neyvt fyrireikaðar áðrenn útboð til bygging. Royndir aðrastaðni frá hava víst, at neyv fyrireiking og stutta byggistíð hevur gjørt, at byggiverkætlanir hava eydnast væl.

### Tætt við brúkaran

Í einari byggiverkætlan er umráðandi, at krøv og ynskir frá brúkarum verða staðfest, og at verkætlanin livir upp til ynskir hjá byggiharranum. Við støði í yvirskipaðum hugskotið verður nágreinlig byggiskrá skrivað, sum inniheldur staðseting, fríøkir, stødd, brúkaraynskir, byggiprinsippir, krøv til dygd, jarðfrøði, veðurlag, fornfrøði, lendislýsing, grannalag, umhvørvi, arkitektur, faðurfrøði, funktión, logistik o.a.

### Realistisk mál

Tað er avgerandi, at málsetningurin er væl avstemmaður, tá verkætlanir verða settar í verk, fyri at samsvar skal verða í millum krøv og játtan. Hetta merkir, at játtanin tekur hædd fyri krøvum til góðsku, funktiónir og burðardygd.

Um málsetningurin verður broyttur í tilgongdini, eigur játtanarkarmurin at verða endurskoðaður.

### Fakligir førleikar og royndir

Tað eru ymisk sløg av uppgávum, sum krevja ymiskar førleikar og royndir.

Tað er tí umráðandi, at tryggja fakligir førleikar og royndir eru til staðar í verkætlanar tilgongdini. Tí skal byggiharrin/verkætlanartoymi hava bestu fakligu førleikarnar og royndirnar.

Fakligu førleikarnir og royndirnar finnast í Føroyum, her undir eisini royndir at byggja eftir føroyskum viðurskiftum.

## VAL AV RÁÐGEVARA

### Bestur til uppgávuna

Við prinsippinum "bestur til uppgávuna" verður hvør einstøk verkætlan tryggjað bestu førleikarnar.

Innkeyparin av veitingum og tænastum skal hava førleikar og atgongd til eitt fakligt bakland.

### Fleiri at velja ímillum

Tað er umráðandi, at tað eru fleiri at velja ímillum, soleiðis at byggiharrarin/verkætlanarleiðarin hevur eitt insitament at fáa samstarvið at fungera og at røkka málsetninginum við verkætlanini. Tað er umráðandi, tá ið veitingar verða bodnar út, at útbjóðingartilfarið er nágreinligt og týðuligt.

Væleydnað verkætlanarleiðsla er í stóran mun tengd at fólki við røttum hugburði, skikkaðari útbúgving og royndum. KT-skipanir, góðskutrygging, førleikamenning og fyriskipanir, kunnu hjálpa til, at nærkast eini fullgóðari verkætlanarleiðslu, men tað er ein fortreyt, at røttu fólkini eru til staðar, fyri at fáa eina fullgóða verkætlanarleiðslu.

Í dag nýta fleiri privat feløg, almen partafeløg, kommunur og kommunalir felagsskapir, privatar ráðgevarar til stýring av sínum verkætlanum. Uppgávan kann skifta frá, at ráðgevin hevur fulla projektábyrgd til, at hann ráðgevur byggiharranum, sum hevur egnan verkætlanarleiðara.

Talan kann vera um avtalur fyri ráðgeving har byggiharrin kann keypa veitingar eftir tørvi, henda veiting kann vera boðin út, tað kann verða gjørt sum rammuavtalu útboð fyri eitt tíðarskeið á t.d. 3-4 ár. Avtalan skal áseta treytirnar fyri samstarvinum og byggiharrin/aðalráðið kann sostatt keypa veitinga eftir tørvi frá ráðgevaranum.

# LEISTUR TIL SKIPAN

Bygnaður, yvirblikk og fyrireiking av útboð og avtalum

Ábyrgd - RGF viðm.

| Heiti/Funktión | |
|---|---|
| **Ánarin** | Ánarin, t.d. eitt Stjórnarráð hevur yvirskipaðu ábyrgdina av:<br><br>1. Játtanini til verkætlanini<br>2. At samsvar er millum ambitiónsniveau og fíggjarkarm<br>3. At byggitíð og kostnaður halda, og at dygdin er í lagi<br>4. At seta eina kvalifiseraða, einfalda, einstreingjaða og haldføra projekt-organisatión, har ongin ivi er um heimildir og ábyrgd (Innkeypara/byggiharra) |
| **Innkeypari/Byggiharri** | Innkeyparin/byggiharrin hevur ábyrgdina av:<br><br>5. At samsvar er millum ambitiónsniveau og fíggjarkarm, og at ánarin er vitandi um og tekur ábyrgd av neyðugum váðaískoytum, ið skal tryggja fíggjarætlanina.<br>6. At byggingin hevur tað dygd, sum er ætlað, og at kostnaður og byggitíð halda.<br><br>*RGF viðm.*<br>*Tað hevur alstóran týdning, at Innkeyparin/byggiharrin refererar beinleiðis til ánaran, at frástøðan er so lítil sum gjørlig, og at ongi óneyðug lið eru ímillum.*<br><br>*Innkeypara-/Byggiharraleikluturin kann røkjast veitast út til:*<br>- *Einstakar royndar og skikkaðar persónar*<br>- *Ráðgevarafyritøkur við neyðugum førleikum*<br><br>7. Fyrireika verkætlanina so væl sum gjørligt:<br>- Í fyrsta umfari at greina allar neyðugar fortreytir fyri verkætlanina, t.d. tørvslýsingar o.a. (idéoplæg)<br>- Í øðrum umfari við at fáa framleitt eina byggiskrá (kravspecifikatión) fyri verkætlanina, sum byggir á hollar royndir og vitan um bygging og brúk og á grundigar hoyringar av ánara, brúkarum o.ø.<br><br>*RGF viðm.*<br>*Bestu førleikarnir at gera 'Idéoplæg', byggiskráir og aðrar greiningar liggja eftir okkara tykki hjá føroysku ráðgevarafyritøkunum. Hesar veitingar eiga tí við fyrimuni at verða veittar út.* |
| **Ráðgeving** | 8. At veita ella bjóða projekteringina út<br><br>*RGF viðm.*<br>*Ráðgevarafelagið mælir staðiliga til, at allar projekteringsuppgávur verða veittar út til føroyskar ráðgevarafyritøkur – tí tað er her, førleikarnir liggja.* |

*Ráðgevarafelagið tekur eisini undir við kappingum um ráðgevaruppgávur, t.d. sum arkitektakappingar, men tó treytað av, at:*

- *Útbjóðingartilfarið er nágreiniligt og týðiligt*
- *Treytirnar eru púra greiðar, og at byggiskáin er væl úr hondum greiddur*
- *Neyðug tíð verður sett av til kappingar*
- *Samsvar er ímillum samsýning og tað, sum biðið verður um*
- *At dómsnevndin hevur royndir og fakligar førleikar og neyvar leiðreglur fyri dømingina.*

*Ráðgevarafelagið sær lítlan vinning í og mælir frá at trýsta samsýningina fyri projekteringina ov nógv við teirri grundgeving:*

- *At hetta er ein sera týðandi partur av at fyrireika verkætlanina væl og virðiliga.*
- *At eitt gott projekt er ein avgerandi fortreyt fyri einum væleydnaðum úrsliti.*
- *At ráðgevarasamsýningin er ein lutfalsliga lítil partur av samlaða kostnaðinum.*

9. At seta best skikkaða ráðgevan ella ráðgevaratoymið

10. Tá høvuðsprojektið er liðugt og dygdartryggjað at bjóða byggiarbeiðið út millum føroyskar arbeiðstakarar, sum hava førleika og orku til byggiarbeiðið.

11. At seta byggileiðslu og eftirlit

*RGF viðm.*
*Ráðgevarafelagið metir, at bestu førleikarnir at føra byggileiðslu og eftirlit liggja hjá ráðgevarafyritøkunum. Hesar veitingar eiga tí við fyrimuni at verða veittar út.*

12. Innkeyparin/Byggiharrin hevur vanliga uppgávuna at samskifta við jarðareigarar, áhugabólkar, friðingarmyndugleikar og aðrar myndugleikar og veitarar.

13. At avhenda ánaranum tað, sum bygt er.

**Hoyringsskriv: P/F Eystur- og Sandoyartunlar**

Takk fyri innbjóðingina at verða hoyringspartur.

Okkara hoyringsskriv tekur støði í hvussu, vit hava skipað verkætlanina at byggja Eystur- og Sandoyartunnilin.

**Skipan av verkætlanini:**

Nevnd og stjórn:

Felagið P/F Eystur- og Sandoyartunnilin er skipað sum partafeløg eru, við ein nevnd og stjórn. Í nevndini eru 5 limir og nevndarfundir verða hildnir regluliga, har allar yvirskipaðar avgerðir verða tiknar. Eftir at verkætlanin er farin í gongd verður kunnað um status á verkætlanini í mun til tíð og kostnað, avbjóðingar og hvussu evt. avbjóðingar verða loystar, sum ikki krevja nevndarsamtykt. Aðrar størri avgerðir verða eftir innstilling, lagdar fyri nevndina til støðutakan.

Í stjórnini situr ein persónur og er hann einasti persónur, sum er fast starvsettur í felagnum. Stjórin hevur fíggjarliga útbúgving og drúgvar royndir.

Verkætlanarleiðari:

Síðan er ein verkætlanarleiðari leigaður inn frá privatari fyritøku, sum byggiharraráðgevi og vísir hesin til stjóran. Verkætlanarleiðarin hevur drúgvar royndir at stýra og leiða størri byggiverkætlanum og er útbúgvin verkfrøðingur.

Verkætlanarleiðarin fyrireikar verkætlanina, herundir skipar, stýrir og samskiftir við ráðgevarar, myndugleikar o.o. á tekniska økinum. Verkætlanarleiðarin er leigaður inn eftir tørvi, men arbeiðir mest sum fulla tíð á verkætlanini orsaka støddina á verkætlanini. Stjórin og verkætlanarleiðarin arbeiða í tøttum samstarvi.

Byggileiðari og fakeftirlit:

Á byggiplássinum stýrir innleigaður byggileiðari verkætlanini dagliga. Hann samskiftir við arbeiðstakaran, góðkennir rokningar fyri útført arbeiði og skipar fakeftirliti, sum eisini er leiga inn. Byggileiðarin vísir til verkætlanarleiðaran og arbeiðir í tøttum samstarvið við hann.

Aðrir ráðgevarar:

Støddin og kompleksiteturin á verkætlanin ger, at nógvir ymiskir ráðgevarar eru knýttir at verkætlanini. Hesir veita ráðgeving og verða leigaðir inn eftir tørvi (ad-hoc basis). Flestu ráðgevarnir hava verið knýttir at verkætlanin seinastu 9 árini.

Fíggjarstýring:

Stjórin hevur yvirskipaðu ábyrgdina av verkætlanini. Harumframt hevur hann ábyrgdina av fíggjarstýringini, hvussu kostnaðir verða skipaðir og skrásettir, soleiðis at yvirlit allatíðina er av samlaðu kostnaðunum fyri verkætlanina. Mínar royndir eru, at ofta uppstanda misskiljingar millum samlaða byggikostnaðin, tað er handverkarakostnaðin (arbeiðstakara kostnaðin) og aðrar kostnaðir sum eru knýttir at verkætlanini. Orsøkin kann verða, at talan er um ymiskar fagbólkar, sum samskifta saman og tí kunna misskiljingar koma fyri. Tí er neyðugt við eini sera neyvari skipan av fíggjarstýringini, so yvirlit er yvir allar kostnaðir á verkætlanini og ávirkanina á allar kostnaðir, um t.d. verkætlanin verður seinka, broytt ella okkur annað. Statusrapportir sum vísa status á verkætlanini í mun til gjørt arbeiði, kostnað og tíð og væntaðan enda kostnað verða regluliga gjørdar og rapporteraðar.

Fyrimunir við at skipa verkætlanin á hendan hátt:

Fyrimunurin við at skipa verkætlanina á henda hátt, er at byggiharrin kann leiga inn fólk, við júst tí servitanini, sum tørvur er á tey tíðarskeiðini í verkætlanini, tá tøvur er á teimum. Fyri nógv tann størsta partin, er talan um føroyskar ráðgevarar, og tí liggur henda vitanin eftir í landinum, og kann tæna bæði almennum og privatum byggiharrum frameftir. Tí fer vitanin ikki fyri skeyti, hóast byggiharraráðgevarnir ikki eru fast starvsettir í einum almennum stovni.

Vansar:

Vitanin frá eini verkætlan verður evt. ikki verðandi á einum sentralum stovni/ráði. Tó er tað soleiðis, at tað hevur víst seg, at tað kann verða sera stór útskifting av fólki á einum stovni, sum stendur fyri byggiverkætlanum. Hetta gongur serliga útyvir størri verkætlanir, sum taka langa tíð at gjøgnumføra. Harafturat er ein almennur stovnur bundin av sáttmálaviðurskiftum sum gera, at hann ikki er kappingarførur, í mun til at draga at sær og fasthalda fólk við servitan innan ávís økir, í mun til privata vinnulívið.

Vinarliga/Best regards

Teitur Samuelsen

Stjóri

P/F Eystur- og Sandoyartunlar

Box 60

Rektaragøta 10

Fo-100

Tórshavn

Faroe Islands

Tel. +298 231000

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

**Hoyringsskriv: Landssjúkrahúsið**

Tórshavn 5. september 2023

## Viðmerkingar um skipan av almennum byggiverkætlanum frameftir

Undirritaði hevur viðgjørt spurningin aman við Jóan Símun Saltá, depilsleiðara fyri Tænastudepilin á Landssjúkrahúsinum, sum m.a. hevur alt tað tekniska økið undir sær. Her við okkara viðmerkingar.

Útfrá okkara royndum við verkætlanini um H-bygningin og annars øðrum byggi- og viðlíkahaldsverkætlanum seinastu árini saman við Landsverk, meta vit, at Møguleiki 2 sannlíkt er tann loysnin, sum vit á Landssjúkrahúsinum fara at mæla til. Um hugsað verður um sjúkrahúsbygging bæði nú og frameftir, so meta vit, at vitanin til tílíka bygging liggur best í HMR/Sjúkrahúsverkinum.

Tað eru ymiskar orsøkir til tess. Ein orsøk er manglandi kontinuitetur. Av teimum starvsfólkunum á Landsverk, sum vóru við at byrja H-bygningsverkætlanina, eru í dag eingin ella nærum eingin eftir á stovninum. Tað hevur havt við sær, at nógv av teimum upprunaligu tonkunum um skipan av bygninginum, eisini eru fokin við teimum. Landsverk hevur havt fleiri uttanhýsis verkætlanarfólk í starvi undir allari byggitilgongdini. Vit duga ikki at meta um, men kunnu ikki ímynda okkum, at hendan vitanin er á stovninum í dag.

Landsverk hevur havt fleiri føroyskar ráðgevarar til at ráðgeva. Tað hevur riggað í ávísan mun, men í teimum førum tað ikki hevur riggað, hevur talan verið um, at føroyskir ráðgevar hava havt útlendskar ráðgevar til at ráðgeva sær. Hetta kann ikki verða rætti leisturin viðvíkjandi ráðgeving.

Verkætlanin við H hevur borið kostnaðin av øllum hesum fólkunum undir byggitíðarskeiðinum. Vit meta, at við Møguleika 2, so er møguligt at spara burtur hesi millumlið.

Stovnar sum Landssjúkrahúsið umboða ein sera stóran part av øllum almennum bygningum hjá landinum og harvið eisini núverandi og komandi verkætlanir. Vit meta ikki, at tað er ein vansi, at HMR/Sjúkrahúsverkið byggir eina 'verkætlanareind' upp við egnari serfrøði í mun til leiðslu av sjúkrahúsbyggjaríi. At hendan eindin verður gjørt er ein fortreyt fyri Møguleika 2.

Tað fer altíð verða neyðugt at hava uttanhýsis byggiharraráðgevar. Til ávís arbeiðir á sjúkrahúsinum eru tað fáir ráðgevarar, sum hava royndir og í summum førum eingin føroyskur ráðgevi. Týdningarmiklast er, at ráðgevarnir eru teir best skikkaðu og hava røttu førleikarnar. Tað er ikki nøkur treyt, at teir skulu verða føroyskir.

Fyri teir størstu stovnarnir hjá landinum, herundir Landssjúkrahúsið, meta vit sum sagt, at Møguleiki 2 er at fyritrekkja. Tó duga vit væl at síggja, at Møguleiki 1 kann geva góða meining fyri smærri stovnar, har ein 'verkætlanareind' ikki kann bera seg.

GG: Eg meti, at tit fáa mest burturúr, við at bjóða bæði Jóan Símun og meg til hoyringsfundin mánadagin 18. september 2023.

Vinarliga

Steinar Eirikstoft, forstjóri


J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

Undirvísingarstýrið

+ 298 200 900
undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn
www.undirvising.fo

Fíggjarmálaráðið

5. september 2023

Takk fyri møguleikan at geva hoyringssvar um framtíðar mannagongd við almennum byggiverkætlanum.

Síðan eg byrjaði í Mentamálaráðnum í 2018, havi eg verið knýttur at gongdini við byggiverkætlanunum á undirvísingarøkinum. Síðan Undirvísingarstýrið bleiv skipað 2019 havi eg somuleiðis verið knýttur at tilgongdum av byggiverkætlanum á økinum. Í løtuni siti eg sum stýrisbólkaformaður fyri útbyggingini av Miðnám á Kambsdali og havi annars verið partur av bygginevndini fyri útbyggingini av eftirskúlanum Rásini.

Byggiverkætlanir á undirvísingarøkinum eru nú undir Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, og hevur landsstýrismaðurin á økinum evstu ábyrgd av hesum. Fastur mánaðarligur fundur er millum Landsverk og ráðið og havi eg síðan 2018 tikið lut á hesum fundum.

Sum undirvísingarmyndugleiki, hava vit ikki serkunnleika í bygging ella leiðslu av byggiverkætlanum. Tí er neyðugt við tøttum samstarvi við Landsverk, og partvís eru vit bundin av tí vegleiðing, ráðgeving og tilmælum, ið Landsverk kemur við, tí førleikarnir innanhýsis ikki eru til staðar at gera egnar byggitekniskar metingar og harav fíggjarligar metingar. Vit kenna øll, til hvussu gekst við byggingini av Glasir og vísit hetta sjónligar veikleikar í hesum leisti.

Síðan er roynt at gera skipanir fyri byggiverkætlanir, ið skulu forða fyri, at komið verður í líknandi støður. Hetta setir krøv bæði til Landsverk og til myndugleikan. Ikki minst til rapporteringsskipanir, soleiðis at serliga politiski myndugleikin kennir seg tryggan við støðuna.

Arbeiðsbólkurin, sum landsstýrið hevur sett niður at umrøða, hvussu farast skal fram í framtíðini, hevur tríggjar møguleikar:

1) Verandi skipan – við dagføringum
2) Ábyrgdin aftur til ráðini
3) Ein desentralisering  (skal tað ikki vera ein centralisering?)

Ad 1) Sum eg skilji tað, so er tað hetta, sum nú er sett í verk – ein dagførd skipan. M.a. við at útbyggingin av Miðnámi á Kambsdali nú er skipað við einum stýrisbólki. Landsverk hevur bøtt munandi um innanhýsis mannagongdir.

ad 2) Sum eg skilji tað, so er hetta at venda aftur til skipanina, sum var galdandi áðrenn aldarskiftið. Tað var helst av góðum orsøkum, at farið var frá hesi skipan tá.

Ad 3) At ábyrgdin fyri allari bygging liggur í einum ráði ger uppgávu- og ábyrgdarbýtið greitt. Tað verður ikki nevnt í uppritinum, men hugsandi er, at eitt slíkt ráð kemur at hava týðandi fíggjarlig

áhugamál, tá ráðið kemur at umsita, alla ella størsta partin av løgujáttanini og harvið eisini hava avgerðandi leiklut í raðfesting av peningi, ið verður nýttur til løgur.

Hinvegin skal byggiteknisk vitan og fíggjarlig stýring ikki undirmetast, tí flestu almennu byggiverkætlanir eru ógvuliga fíggjarliga stórar og avgerðandi fyri samfelagið. Tí má stýring til og skil vera í. Tað gevur ikki meining, at hvørt ráð sær skal hava byggitekniska vitan, hetta verður alt ov smábýtt, og ikki verður gjørligt at fáa stórrakstrar fyrimunir.

Vansin, sum víst verður á, um frástøðu millum tann, ið skal brúka bygningin og tann ið byggir, kann m.a. loysast við ásetingum um at tann, ið skal brúka bygningin er við í allari tilgongdini eitt nú við umboðum í stýrisbólki og luttøku í tilvísingarbólkum. Fyri so vítt tann skipanin Landsverk hevur sett í verk, men við øðrum uppgávubýti.

Farast má frá einum hugsunarhátti, har tað er ein almennur politiskur byggiharri og ein annar poltiskur eigari av bygninginum. Hugsanin eigur at verða, at talan er um alment byggimál, sum vit øll hava áhuga í eydnast so skynsamt sum tilber, og eigur øll tilgongdin at vera skipað út frá hesi fortreyt, m.a. við greiðum mannagongdum fyri avgerðartilgongdum, eftir at støða er tikin til, at farast skal í gongd við eina byggiverkætlan.

Tryggjast má, at tann myndugleikin, ið skal brúka bygningin, er við í processunum, so ikki verður komið í ta støðu, at ónøgdin verður munandi, tá ein bygningur skal takast í brúk til ávís endamál. Tó vera krøv og ynskir hjá brúkarum helst altíð størri, enn hvat til ber at veita, so ein skynsom javnvág má finnast millum ymisk atlit, so sum fíggjarlig atlit og brúkara atlit.

Mín persónliga hugsan er, at vansarnir við verðandi skipan eru so mikið stórir, at roynt eigur at vera við møguleika trý, sum er at skipa allar byggiverkætlanir undir einum ráði.

**Undirvísingarstýrið**

Hjalmar Hansen
*stjóri*

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

**Løgmansskrivstovan**

**Att.: John Rajani, Løgmansstjóri**

Tórshavn 7. september 2023

Tykkara tilv./Your ref.:

## Viðv. skipan av almennum byggiverkætlanum

Føroya Handverksmeistarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag takka fyri møguleikan at viðgera málið, hvussu almennar byggiverkætlanir best verða skipaðar framyvir, og luttaka feløgini fegin í tí víðari viðgerðini.

Feløgini taka undir við, at verandi skipan verður eftirmett og broytt. Ein effektiv skipan økir um sannlíkindini fyri, at almennar byggiverkætlanir verða gjørdar til tíðina, til avtalaðan kostnað og við teirri ásettu góðskuni. Niðanfyri eru innleiðandi viðmerkingar, sum kunnu verða útdjúpaðar á hoyringsfundinum seinni í sept.

Feløgini gera vart við, at bygnaðurin í s.v. byggiverkætlanir bara er partur av spurninginum, sum eigur at verða viðgjørdur. Líka so umráðandi er tað, hvørjar heimildir, hvørja ábyrgd og hvørjar førleikar aktørarnir hava í tí bygnaði, sum verður valdur, og at neyðuga tíðin og neyðugu fakligu førleikarnir eru í organisatiónini til at fyrireika byggiverkætlanina væl og virðiliga. Eisini hevur tað stóran týdning, at neyðugi kontinuiteturin er í starvsfólkahópinum hjá teimum, sum skulu taka sær av bygging hjá tí almenna.

Yvirskipað er tað umráðandi at talan er um ein einstreingjaðan bygnað við einfaldum “kommandolinjum”, greiðum heimildum at taka avgerðir, og við fáum organisatiónsløgum.

Í mun til bygnaðin halda feløgini tað ikki vera eina góða loysn at lata verkætlanarstýringina út til hvørt einstakt ráð, tí tað sum heild ikki eru nóg nógvar byggiverkætlanir hjá hvørjum ráði til, at neyðugu førleikarnir og royndirnar kunnu verða uppbygdar har.

Tá er betri við einari felags eind, sum stendur fyri at leiða byggiverkætlanir, og at tað heldur verður arbeitt við at gera bygnaðin fyri eindina so einfalda sum gjørligt. Tað er ikki talið á fólki sum er avgerandi, men at tey fólkini sum eru í eindini eru sera væl kvalifiseraði, serliga innan sáttmálastýring, verkætlanarstýring og fíggjarstýring innan bygging. Partur av hesum er eisini førleikin at gera kravfestingar.

Eisini er umráðandi, at starvsfólkini í hesari eindini, sum taka sær av nýbyggingum, ikki verða órógvaði av øðrum meira rakstrarkendum uppgávum, t.e. viðlíkahald, kavarudding, skervframleiðslu, asfaltframleiðslu, smiðjur, tunnilsarbeiði o.s.fr., so tey kunnu hugsavna seg um kjarnuuppgávurnar í s.v. nýbygging og umbygging.

Í tilfarinum, sum varð sent til viðmerkingar, var nakað gjørt burturúr at staðfesta ábyrgd fyri verkætlanina. Um ivi er um samanblanding av ábyrgd, er einfalda loysnin at leggja játtanina til ítøkiligu byggiverkætlanina hjá hesari felags eindini, so tað slepst undan, at játtanin til byggiverkætlanina liggur hjá einum ráði/stovni, meðan stýringin av verkætlanini liggur hjá einum øðrum ráði/stovni. Á henda hátt fylgjast játtan og avgerðir í s.v. verkætlanina.

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo

Annars er týdningarmikið at definera hesar uppgávur í organisatiónini, og at tær ikki verða blandaðar saman:

**Verkætlanaránarin**
Verkætlanaránarin er tann, sum eftirspyr bygningin. Hesin skal sjálvsagt hava ein týðandi leiklut at verða við til at lýsa tørvin, men eigur ikki at hava ein aktivan leiklut at stýra byggingini. Umboðið fyri verkætlanaránaran skal helst verða ført fyri taka avgerðir, tá tørvur er á tí. Hetta kann t.d. vera stjórin/aðalstjórin, ella onkur nær stjóranum.

**Innkeyparin**
Verkætlanaranarin ger avtalu við ein kvailfiseraðan innkeypara, sum virkar sum byggiharri fyri byggiverkætlanir hjá tí almenna. Innkeyparin skal tryggja ambitiónsniveau og samsvarandi fíggjarkarmar. Tað eigur at vera sami innkeypari av byggiverkætlanum fyri alt tað almenna fyri at tryggja kontinuitet og førleikamenning, og at tað almenna kann gagnnýta royndirnar.

**Verkætlanarleiðarar**
Innkeyparin setir væl skikkaðar verkætlanarleiðarar til at stýra einstøku verkætlanunum. Verkætlanarleiðararnir stýra byggigongdini í einstøku verkætlanini, og mugu í hesum sambandi hava neyðuga ábyrgd og heimildir til at taka avgerðir. Eisini er umráðandi at verkætlanarleiðarin kemur tíðliga inn í verkætlanina. Talan kann vera um verkætlanarleiðarar, sum eru settir í starv hjá innkeyparanum, ella at sáttmáli verður gjørdur við privatar fyritøkur.

Verkætlanarleiðararnir keypa ítøkiligu veitingarnar frá privatum feløgum, herundir hugskotsupplegg, byggiskrá, prosjektering, bygging og eftirlit. Tætt samband má vera millum innkeypara og verkætlanarleiðara.

Feløgini luttaka sum sagt fegin í víðari arbeiðinum við at skipa almennu byggiverkætlanirnar.

Vinarliga
Føroya Handverksmeistarafelag
Føroya Arbeiðsgevarafelag